| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. september 2018 | Blað nr.: 787 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. september 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 203/18-227/18

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Bjørg Dam
Odd Færø

**LUTTÓKU EISINI:**
Barbara Vang
Jóan Petur Hentze
Sigurð Vang
Marius Muller
David Andresen
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Tina Johannesen

**LUTTÓKU IKKI:**
TRÓNDUR SIGURÐSSON

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 203/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 790 |
| 204/18 | 18/03330-5 | Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2017 Westward Ho | 791 |
| 205/18 | 18/03064-2 | Matr.nr. 1æo, Hoyvík. Ognarskifti. | 793 |
| 206/18 | 18/03075-4 | Matr. nr. 992n, Tórshavn. ( Servituttur um víðarisølu frá 1934 ) | 795 |
| 207/18 | 18/03122-3 | Matr. nr. 203, Gríms Kambansgøta 19. Tórshavn. Kommunan hevur tinglýstan forkeypsrætt tinglýstan í servitutti 15.05.1934. | 797 |
| 208/18 | 18/03158-3 | Loyvi til víðarisølu av matr.nr. 992o, Tórshavn. | 799 |
| 209/18 | 18/03178-3 | Matr.nr. 56ch, Kirkjubøur - Argir. Strika servitutt um byggifreist. | 801 |
| 210/18 | 18/02969-2 | Advokatskrivstovan : Umsókn um nýggjan leigusáttmála um kioskina á Vaglinum millum TK og P/f Gist og Vist | 803 |
| 211/18 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 806 |
| 212/18 | 18/03320-1 | Játtan til smærri ítróttaanlegg v.m. | 813 |
| 213/18 | 17/03801-1 | Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið | 815 |
| 214/18 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 819 |
| 215/18 | 17/03883-2 | Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin) | 825 |
| 216/18 | 18/00115-5 | Uppskot um avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum. | 834 |
| 217/18 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 836 |
| 218/18 | 18/01173-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 864a, Tórshavn | 844 |
| 219/18 | 18/02361-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Klingrutjørn II | 849 |
| 220/18 | 18/03140-1 | Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil | 851 |
| 221/18 | 18/01973-1 | Íbúðarbygging undir Kongavarða | 853 |
| 222/18 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 858 |
| 223/18 | 16/01084-1 | Keyp av nýggjum stigabili í sambandi við Glasir | 870 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 224/18 | 18/03385-1 | Langfreistað skuld | 874 |
| 225/18 | 18/03373-1 | Eykajáttan | 875 |
| 226/18 | 18/01927-1 | Fíggjarætlan 2019 | 877 |
| 227/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 882 |

## ***203/18 Mál beind í nevndir 2018***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 110/18 | 18/00020-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 138/18 | 18/00020-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 180/18 | 18/00020-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 203/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 204/18 Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2017 Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 246/18 | 18/03330-5 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 204/18 | 18/03330-5 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Roknskapurin fyri 2017 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2017 verður framlagdur

Nevndarfundur 7. September 2018: Roknskapurin varð góðkendur og undirskrivaður.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Mælt verður fíggjarnevndini til at góðkenna roknskapin.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018**: Einmælt samtykt.

# 205/18 Matr.nr. 1æo, Hoyvík. Ognarskifti.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 247/18 | 18/03064-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 205/18 | 18/03064-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá advokati 17.08.2018.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Talan er um óbygt vinnustykkið á Hjalla. Vídd 1.500m2. Grundstykkið er planerað.

Umsøkjarin greiðir frá, at Sp/F S.H. Smíð, sum eigur ognina matr.nr. 1æo, er farið undir sjálvbodna likvidatión.

Ætlanin er, at móðurfelagið Sp/f 31, sum yvirtekur allar ognir felagsins í sambandi við likviditatiónina, eisini yvirtekur ognina matr.nr. 1æo, Hoyvík.

Móðurfelagið Sp/f 31, eitur nú Sp/f S. H. Ráðgeving, sum hereftir verður tinglýstur eigari av ognini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin.** Ongi

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá Advokati skjal 18/03064-1 og kortskjal, útrokning av rentu, og serviuttur um bygging, 18/03064-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | Býráðsfundur<br>27. september 2018 | Blað nr.: 794<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna víðarisølu av ognini matr.nr. 1æo, Hoyvík, til somu upphædd og til somu treytir sum eru í upprunaskeytinum frá 2002.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 206/18 Matr. nr. 992n, Tórshavn. ( Servituttur um víðarisølu frá 1934 )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 248/18 | 18/03075-4 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 206/18 | 18/03075-4 |

**Upprunin til málið:** Servituttur frá 1934

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Grundstykkið matr.nr. 992n, er frábýtt matr. nr. 992k.

Sambært tinglýstum servitutti á høvuðsmatriklinum, frá 15. mai 1934 stk. 2 framgongur, at " ejendommen må ikke udstykkes og kan indenfor et tidsrum af 10 aar ikke videresølges uden Byraadets tilladelse "

Tað verður mett, at servitutturin ikki hevur týdning longur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. september 2018 | Blað nr.: 796 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna sølu av matr.nr. 992n, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>27. september 2018 | Blað nr.: 797<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 207/18 Matr. nr. 203, Gríms Kambansgøta 19. Tórshavn. Kommunan hevur tinglýstan forkeypsrætt tinglýstan í servitutti 15.05.1934.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 249/18 | 18/03122-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 207/18 | 18/03122-3 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
**Viðvíkjandi ognini matr.nr. 203, Gríms Kambansgøta**

Talan er um eini gomul sethús í Gríms Kambansgøtu, sum hava staðið til sølu hjá meklara. Ognin er seld, men ber ikki til at fáa skeytið tinglýst, vísandi til at kommunan hevur tinglýstan forkeypsrætt. Forkeypsrætturin er tinglýstur í1934.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.**

**Umhvørvisárin. Ongir.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** 18/03122-2 ( Kortskjal ) 18/03122-1 ( servituttskjal )

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☒

**Tilmæli**: Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at strika servituttin um forkeypsrætt í ognini matr. nr. 203, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>27. september 2018 | Blað nr.: 799<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 208/18 Loyvi til víðarisølu av matr.nr. 992o, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 250/18 | 18/03158-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 208/18 | 18/03158-3 |

**Upprunin til málið:** Servittur 1934.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Grundstykkið matr.nr. 992o, er sundurbýtt frá matr.nr. 992i.

Sambært tinglýstum servitutti á høvuðsmatriklinum, frá 15. Mai 1934 stk. 2, framgongur at " ejendommen má ikke udstykkes og kan indenfor et tidsrum av 10 aar ikke videresælges uden Byraadets tilladelse"

Tað verður mett, at servitutturin ikki hevur týdning longur, vísandi til 10 ára áramál frá 1934.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn, kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í Stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna sølu av matr.nr. 992o, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt**.**

## 209/18 Matr.nr. 56ch, Kirkjubøur - Argir. Strika servitutt um byggifreist.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 251/18 | 18/03178-3 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 209/18 | 18/03178-3 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr.nr. 56ch, Kirkjubøur – Argir. Kvíggjartún 7, Argir.
Servituttur um 2 ára byggifreist er tinglýstur á ognina hin 12.05.1987.

Bygningur hevur staðið á ognini, men er hesin bygningur niðurbrendur, og liggur stykkið nú óbygt.

Ognin var í november 2015 seld verandi eigara sum óbygt grundstykkið, men hevur verandi eigari ikki bygt á grundstykkinum, sum nú aftur verður selt sum óbygt grundstykki.

Tinglýsingin ivast í um nýggja skeytið kann tinglýsast uttan loyvi frá kommununi, vísandi til at stykkið í dag liggur óbygt, og hevur meklarin heitt á kommununa um at strika servituttin sum er soljóðandi:

*Eigarin av hesum eigindómi bindur seg til at fullfíggja sína bygging ella góðkent 1. stig av henni innan 2 ár eftir, at hetta skeytið er undirskrivað, og kann eigarin ikki selja stykkið aftur, fyrr enn henda treyt er uppfylt.*

*Verður ikki gjørt, sum her ásett, kann Argja kommuna krevja sær ognarrættin til økið aftur ímóti fullum endurgjaldið av dokumenteraðum útreiðslum hjá eigaranum við rentu 6% p.a. frá yvirtøkudegnum at rokna, hetta tó í fyrsta lagi frá tí av at rokna, at ein útreiðsla er borin.*
*Er nøkur bygging farin fram, so endurrindar Argja kommuna eigaranum dokumenteraðar útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda. Semjast partarnir ikki um hetta og/ella endurgjaldið, v erður tað at áseta av einum gerðarætti, har Argja kommuna útmeldar 1 lim, keyparin 1, meðan triði limurin, ið er formaður, verður útnevndur av Føroya rætti.*

Umsitingin metir ikki at tað er neyðugt at avlýsa generella servituttin um byggifreist v.m., og mælir heldur til at góðkenna víðarisølu av ognini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna víðarisølu av ognini.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 210/18 Advokatskrivstovan : Umsókn um nýggjan leigusáttmála um kioskina á Vaglinum millum TK og P/f Gist og Vist

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 227/18 | 18/02969-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 11.09.2018 | 47/18 | 18/02969-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 190/18 | 18/02969-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 253/18 | 18/02969-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 210/18 | 18/02969-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
**Matr.nr. 382, Tórshavn, uml. 15 fermetrar.**

P/F Gist og Vist søkir um at fáa ein nýggjan sáttmála uppá undirlendið, burturav matr.nr. 382, Tórshavn, millum Tórshavnar kommunu og P/F Gist og Vist.

P/F Gist & Vist hevur keypt kioskina hjá Astu á Vaglinum og ynskir at reka virksemið stórt sæð óbroytt víðari.

Asta arvaði kioskina í 1945 bert 15 ára gomul. Viðheft er skjal, ið lýsir tíðarskeiðið hjá kioskini.

Poul Nicolai doyði í 2001 og Asta hevur síðani verið einsamøll um at reka kioskina.

Leigusáttmálin við Poul Nicolai Jacobsen er frá 24. februar 1982, galdandi frá 01. juli 1981.(viðheftur). Upprunasáttmálin er frá 1974.

Sáttmálin frá 24. februar 1982 ásetur m.a. at:

*Leigarin er skyldugur til uttan kostnað fyri kommunun at flyta kioskina til annað stað innanfyri kommunuskúlagarðin eftir nærri ávísing býráðsins, um býráðið metir hetta neyðugt fyri betri nýtslu av økinum.*

*Leigarin er skyldugur at halda økið uttanum kioskina í góðum standi, soleiðis at tað er til prýði fyri býin, og ikki er loyvt at seta upp reklamuskeltir ella tílíkt á kioskina uttan loyvi frá býráðnum.*

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Leiðarin á stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla til, at málið verður beint í teknisku nevnd og byggi- & býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi-og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Umsitingin tekur undir við at leigusáttmáli verður gjørdur millum P/f Gist og Vist og Tórshavnar kommunu við somu treytum eins í gamla sáttmálanum.

Týdningarmikið er, at leigusáttmálin einans fevnir um leigu av undirlendinum, har bygningurin stendur. Um tørvur er á størri lendi, so verður hetta at avgreiða so hvørt við kommununa.

Fyri at tryggja at virksemið stuðlar undir miðbýarætlanina og tann dám, ið er í økinum, er ynskiligt at ein treyt verður sett í sáttmálan um, at verður virksemið broytt í mun til verandi virksemið, so eigur hetta at verða gjørt í samráð við kommununa.

Longdin á leigusáttmálanum eigur at verða ásett yvir eitt ávíst áramál, t.d. 10 ár, við møguleika fyri at leingja sáttmálan.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at taka undir við at gjørdur verður sáttmáli við støði í verandi sáttmála, at leigusáttmálin einans fevnir um undirlendið, bygningurin stendur á, at treyt um broyting í virkseminum verður ásett í sáttmálanum, umframt at longdin á leigusáttmálanum verður ásett við møguleika fyri at leingja leigumálið og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndini og fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Annfinni Brekkstein um at beina málið aftur í fíggjarnevndina, ið fall við 9 atkvøðum ímóti og 3 atkvøðum fyri.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Odd Færø og Bjørg Dam

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreassen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið var einmælt samtykt.

## 211/18 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |
| 8 Eldranevndin | 04.06.2018 | 2/18 | 17/03195-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 171/18 | 17/03195-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 147/18 | 17/03195-1 |
| 11 Eldranevndin | 10.09.2018 | 9/18 | 17/03195-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 254/18 | 17/03195-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 211/18 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan

av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000m$^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500m$^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500m$^2$ av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing

Til tess at gera tørvslýsingina, ið er grundarlag fyri ítøkiligari byggiskrá, so kvalifiseraða sum gjørligt, er valt at taka brúkaraumboð við servitan innan allar funktiónir við í arbeiðið. Hesi eru ein ergoterapetur, ein fysioterapeutur, ein køksleiðari og deildarleiðarin fyri verandi rehabilitering/umlætting. Harafturat hevur ein eindarleiðari verið við til tess at tryggja skynsemi í rakstri, tá bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu.

Í stuttum verður mælt til 28 pláss býtt í tvær lonir. Við støði í hesum er gjørd meting um starsvfólkanormering og rúmskrá, umframt onnur yvirskipað viðurskifti. Talan verður eftir hesum um bygning uml. 1.800 fermetrar.

Sí tørvslýsing í hjalagda skjalið.

Í ætlan liggur at byggja depilin við Rólantsgøtu í Hoyvík. Hoyring hevur verið hjá eigarafelagnum, og er ynskið borið fram um, at bygningurin skal vera í einari hædd og hava flagtekju.

Brúkaraumboð hava serliga lagt dent á at køkur eigur at verða partur av umlættingar og rehabiliteringsdeplinum. Tí umframt tað heimliga og hugnaliga við at matur verður gjørdur á staðnum, so er kostur ein sera týðandi partur av rehabiliteringini og skal tillagast til einstaka borgarar.
Lágargarður er við at vera á markinum fyri hvussu nógvar døgurðar afturat køkurin megnar at gera afturat tí sum verður gjørt í dag.

Bygginevndin hevur góðkent tørvlýsingina, og klárt er tí at fara undir at gera byggiskrá, tíðarætlan og kostnaðarætlan.

Mett verður skilagott, at eldranevndin eisini umrøður tørvslýsinga til tess at tryggja felags fatan um verkætlanina.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla eldranevndini til, at taka undir við tørvslýsingini sum grundarlag fyri víðari arbeiðinum at gera byggiskrá v.m.

**Eldranevndin 04. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eigarafelagið hevur í hoyringssvari gjørt vart við, at um kommununa velur at brúka økið í Rólantsgøtu til annað enn barnagarð, hevur eigarafelagi rætt til endurgjald.

Umsitingin hevur kannað hetta hjá løgfrøðinginum, sum arbeiddi við avtaluni við eigarafelagið og løgfrøðiliga niðurstøðan er henda:

Kommunan hevur luttikið í útstykkingararbeiðinum og hevur tá goldið fyri 2.500 m2 . Ætlanin var at byggja barnagarð á øki.

Løgfrøðiliga metingin er, at kommunan hevur goldið fyri hetta øki og tí ikki eigur at gjalda einaferð afturat, um kommunan velur at byggja annað enn barnagarð á øki. Um kommunan ætlar at brúka meira enn 2.500 fermetrar, eigur kommunan at gjalda eigarafelagnum fyri tað, sum fer upp um 2.500 fermetrar. Tann kostnaðurin má avtalast nærri við eigarafelagið.

Tann løgfrøðiliga metingin er, at um kommunan ikki fer upp um teir 2.500 fermetrarnar, eigur kommunan ikki at gjalda eigarafelagnum nakað, tí goldið er longu fyri 2.500 fermetrar.

Enn er ikki greitt hvussu stórur ein umlættingar/rehabiliteringsdepil verður og tí er ilt at siga um kommuna hevur tørv á meira enn 2.500 fermetrum. Heldur ikki ber í løtuni til at siga hvat ein evt. kostnaður vildi verið um tørvur er á meira enn 2.500 fermetrum

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og virkandi leiðari á stjórnarskrivstovuni mæla til at Fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at samráðast við eigarafelagi um evt. kostnað um kommunan hevur tørv á lendi sum er størri enn 2.500 fermetrar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at heimila umsitingini at samráðast við eigarafelagið um evt. kostnað um lendi størri enn 2.500 fermetrar. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Anfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 05.09.18 samtykt at bjóða Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin út sum totalentreprisa ætlandi til tríggjar arbeiðstakarar. Tá bjóðað verður út sum totalentreprisa er vanligt, at tey, sum ikki fáa projektið, verða samsýnt fyri teirra uppskot. Til hetta endamál metir tekniska fyrisiting, at tørvur er á 300.000 kr.

Harumframt er tørvur á at gera lendiskanningar av staðsetingini, áðrenn útbjóðingartilfarið kann gerast liðugt. Til hetta krevst 100.000 kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla eldranevndini til at játta 400.000 kr. til 2775 Eldrarøkt (íløgur) L 27011 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil av 2775 Eldrarøkt (íløgur) L00001 Løgukarmur fyri árið og leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 212/18 Játtan til smærri ítróttaanlegg v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 265/18 | 18/03320-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 255/18 | 18/03320-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 212/18 | 18/03320-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Í Fíggjarætlanini fyri 2018 er samtykt løgukonta 5775 Ítróttaanlegg við eini játtan á 1.500 tkr. Kontan er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymsar smærri ítróttaverkætlanir. Av tí at talan er um ymsar smærri verkætlanir er tað høgligar at talan er um eina rakstrarkontu soleiðis at tað ber til at handla skjótari.

Í løtuni er talan um hesar verkætlanir:
150 tkr. til gøtuítrótt í miðbýnum (j.nr. 18/01746)
400 tkr. til ljós til Tórsbreyt (j.nr. 18/02446)
80 tkr. til golfsimulator (j.nr. 18/02547)
250 tkr. til skíðsleipilyft á Sornfelli (j. nr. 17/02861)
100 tkr. til Skjótibreytina í Sandvíkum ætlað til at fáa til vega uppskot frá landslagsarkitekti til skipan av lendinum (j.nr. 15/03761)
520 tkr. til klintring og skating í Bacalao ( j.nr. 16/03313 og 16/04764)

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri** | **Fyri ávís** | **Fyri ávísar** | **Fyri** |
|---|---|---|---|---|

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heita á býraðið um fíggjarnevndina um at flyta 1.500 tkr. av løgukontu 5775 L00001 til rakstrarkontu 5717 Ítróttaanlegg. Harumframt verður mælt til at taka undir við raðfestingini av verkæktlanum sum lýst í málslýsingini.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at játta kr. 1.500 tkr. av løgukarmi 5775 L00001 til nýggja løgukontu Smærri ítróttaverkætlanir. Harumframt samtykt, at játtanin verður býtt til hesi endamál:

- 150 tkr. til gøtuítrótt í miðbýnum (sí j.nr. 18/01746)
- 400 tkr. til ljós til Tórsbreyt (sí j.nr. 18/02446)
- 80 tkr. til golfsimulator (sí j.nr. 18/02547)
- 250 tkr. til skíðsleipilyft á Sornfelli (sí j. nr. 17/02861)
- 100 tkr. til Skjótibreytina í Sandvíkum ætlað til at fáa til vega uppskot frá landslagsarkitekti til skipan av lendinum (sí j.nr. 15/03761)
- 520 tkr. til klintring og skating í Bacalao (sí j.nr. 16/03313 og 16/04764)

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at játta kr. 1.500 tkr. av løgukarmi 5775 L00001 til nýggja løgukontu Smærri Ítrottarverkætlanir og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 213/18 Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 20.11.2017 | 30/17 | 17/03801-1 |
| 2 Eldranevndin | 08.01.2018 | 37/18 | 17/03801-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 94/18 | 17/03801-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 78/18 | 17/03801-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 256/18 | 17/03801-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 213/18 | 17/03801-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Víst verður til skriv frá Kommunufelagnum dagf. 27. oktober 2017 um at menna og seta í verk talgildu heilsuskipanina Cosmic á øllum eldraøkinum. Í skrivinum heitir Kommunufelagið á kommunurnar um at geva felagnum tilsøgn um, at kommunurnar seta neyðuga peningin av til endamálið, hetta til tess, at felagið kann gera avtalu við Landssjúkrahúsið.

Sum lýst í skrivinum hevur verið tilgongd um at fáa talgildu heilsuskipanina til eldraøkið. Cosmic er í dag talgilda sjúklingajournalskipanin á heilsuøkinum, og av tí at heilsuøkið er tað økið, sum eldraøkið hevur størstan tørv á at samskifta fakliga við um brúkarar, eru fleiri fyrimunir at velja somu skipan.

Tá eldraøkini fara at nýta Cosmic, fer borgarin at uppliva eina betri tænastu, tí samskiftið um hansara viðurskifti millum eldraøkið og heilsuøkið verður meira samanhangandi, tryggari og skjótari. Hetta fer eisini at minka um feilir, ið koma av ógreiðum, ófullfíggjaðum ella skeivum upplýsingum, eins og tíðin at leita fram upplýsingar styttist.
Cosmic er lagað til føroyska heilsuverkið, og mett verður, at hon við bert fáum tillagingum kann brúkast á eldraøkinum. Hetta er tí eisini ein bíligari loysn, enn tað hevði verið at ment eina aðra skipan at nøkta tørvin á røktarpartinum av eldraøkinum.

Í fyrsta lagi er ætlanin, at nøkur starvsfólk í øllum økjum fáa lesi-atgongd til skipanina. Til tað er neyðugt at velja starvsfólk, greina rættindi í mun til fakbólkar, kanna og taka avgerð um og skipa kt-støði og –útgerð, og menna superbrúkarar.

Harumframt skulu skipast fylgibólkar, økið skal lýsast og skjalfestast, og markamót og mannagongdir lýsast og skjalfestast.

Tilgongdin er mett at taka tilsamans 2 ½ ár. Tá verður verandi 3V skipan, ið er ein veitingar- og konteringsskipan, niðurløgd, tí henda skal byggjast inn í Cosmic.

Skipanin skal í ávísan mun lagast til tørvin á eldraøkinum. Tí er ikki ráðiligt at seta fullu nýtsluna av skipanini í verk í øllum økjum samstundis. Ætlanin er tí at byrja við royndarøkjum. Kommunufelagið hevur her mælt til, at royndarøki verða NBH (norðoyggjar) og eitt av heimunum í Tórshavn (Boðanesheimið).

**Kostnaðarmeting 2018-2021**

| Kostnaður | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2018 | | 2019 | 2020 | 2021 | |
| **Evni** | **Íløla** | **Rakstur** | **Rakstur** | **Rakstur** | **Íløga** | **Rakstur** |
| **Rakstur** | | | | | | |
| Servarar, undirstøðukervi | | 200.000 kr | 200.000 kr | 200.000 kr | | 200.000 kr |
| Applikatiónssupport | | 900.000 kr | 1.500.000 kr | 1.500.000 kr | | 1.500.000 kr |
| Cosmic Licensur | | 500.000 kr | 850.000 kr | 1.150.000 kr | | 1.200.000 kr |
| Linja til Elektron | | 50.000 kr | 50.000 kr | 50.000 kr | | 50.000 kr |
| Verkætlanarleiðsla (KF) | | 900.000 kr | 900.000 kr | 600.000 kr | | 450.000 kr |
| **Rakstur tilsamans** | | **2.550.000 kr** | **3.500.000 kr** | **3.500.000 kr** | | **3.400.000 kr** |
| | | | | | | |
| **Íløgur** | | | | | | |
| Servarar backbone Cosmic | 330.000 kr | | | | 2.000.000 kr | |
| Nova røktarmodul | 600.000 kr | | | | | |
| **Íløgur tilsamans** | **930.000 kr** | | | | | |
| | | | | | | |
| **Allar útreiðslur tilsamans** | | **3.480.000 kr** | **3.500.000 kr** | **3.500.000 kr** | | **5.400.000 kr** |

Kostnaðurin verður býttur millum kommunurnar eftir talinum at borgarum eldri enn 67 ár. Gjaldið fyri Tórshavnar kommunu í 2018 verður eftir hesum kr. 1.320.261 (38%).

Aftrat verða ávísar útreiðslur til starvsfólk í sambandi við upplæring, avloysarar v.m. Fyrisitingin mælir greitt til, at Comsic verður ment og sett í verk til eldraøkið eisini. Arbeitt hevur verið við hesum síðan arbeiðið at yvirtaka eldraøkið byrjaði. Tá fult sett í verk, verður gamla 3V skipanin niðurløgd og árligi kostnaðurin av tí, umleið kr. 300.000, spardur burtur.

Í mun til fíggjartørvin, so er í uppskotinum til fíggjarætlanin 2018 ikki lagt upp fyri hesum. Mett verður neyðugt við nýggjari játtan til endamálið, eisini tí, at talan verður um varandi kostnaðir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla eldranevndini til at geva Kommunufelagnum tilsøgn um, at Tórshavnar kommuna tekur lut í ætlanini við Cosmic, og at játtan kr. 1,5 mió verður fingin til vega í fíggjarætlanini 2018 til kontu 2720 Heilsuhúsið.

**Eldranevndin 20. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Nú fíggjarætlanin fyri 2018 er samtykt, kann staðfestast, at eingin játtan er sett av til útvegan av Cosmic til Heilsu- og umsorganartænastuna. Við støði í fíggjarætlanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni fyri 2018 verður mett heldur ikki rúm fyri so stórari upphædd til endamálið uttan stór inntriv í annað virksemi, ið annars er raðfest.

Tí hevur ikki borið til at boða Kommunufelagnum frá tilsøgn um luttøku í verkætlanini.

Sum skilst er Tórshavnar kommuna einasta kommunala øki í landinum, sum ikki verður við í verkætlanini.

Talan er um eina verkætlan, sum fyrisitingingin og fakfólk í eldrarøktini í Tórshavnar kommunu meira enn nakar annar hevur viljað raðfest sum avgerandi partur í trygdini, dygdini og røttu tænastuni til einstaka borgaran.

Sum støðan er, fær Tórshavnar kommuna ikki møguleikan at mynda og tillaga skipanina til tørvin hjá Heilsu- og umsorganartænastuni, sum er nógv tann størsti brúkarin og veitarin av eldrarøkt, umframt at Heilsu- og umsorganartænastan ikki fær lut í talgildu samskiftismøguleikunum við sjúkrahúsverkið og kommunulæknarnar annars, og er hetta stórt afturstig.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla staðiliga til at fáa til vega neyðuga játtan til Cosmic samsvarandi tilmælinum til fundin 20. november 2017.

**Eldranevndin 08. januar 2018:** Tikið til eftirtektar.

**Ískoyti:**
Cosmicverkætlanin er komin nakað í drag, partvís tí enn veður bíða eftir, um TK er partur av verkætlanini. Øll kommunalu samstørvini hava givið tilsøgn og sett pening av til verkætlanina. Ein onnur grund til, at verkætlanin ikki er byrja enn, er at Kommunufelagið er farin at endurskoða víðari framferðarháttin og ger uppskot til verkætlanarleiðslu. Av tí at verkætlanin ikki er farin í gongd sum ætla, kann væntast at kostnaðurin fyri 2018 verður nakað lægri enn fyrst mett. Til ber tó ikki í løtuni at siga hvat munurin vildi verið. Ætlandi kann verkætlanin fara av bakkastokki til heystar og í tí sambandi verður nýggj kostnaðarmeting gjørd.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og Trivnaðarstjórin mæla til at geva Kommunufelagnum tilsøgn um, at Tórshavnar kommuna tekur lut í ætlanini við Cosmic. Tá tíðarætlan og dagførd kostnaðarmeting er fingin til vega verður málið at leggja fyri fíggjarnevnd aftur. Hædd eigur harumframt takast fyri kostnaðinum í fíggjarætlanini fyri 2019.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til mál nr. 18/03373.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at játta kr. 1,5 mió. til verkætlanina. Víst verður til fígging í máli nr. 18/03373.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 214/18 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til árskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini.*"

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um árskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

## 215/18 Skúlin á Fløtum - hølisviðurskifti (Realskúlin)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 308/17 | 17/03883-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 3/18 | 17/03883-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.02.2018 | 58/18 | 17/03883-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 08.02.2018 | 70/18 | 17/03883-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 90/18 | 17/03883-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 11.04.2018 | 129/18 | 17/03883-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 150/18 | 17/03883-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 130/18 | 17/03883-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 82/18 | 17/03883-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 167/18 | 17/03883-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 139/18 | 17/03883-2 |
| 12 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 114/18 | 17/03883-2 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 163/18 | 17/03883-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 215/18 | 17/03883-2 |

**Upprunin til málið:**
Uppskot frá skúlastjóranum í Skúlanum á Fløtum um, hvussu høli í skúlanum kunnu skipast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í oktober var dialogfundur millum leiðsluna í Skúlanum á Fløtum og umboð fyri mentamáladeildina. Eitt evni á fundinum var hølisviðurskiftini. Skúlin á Fløtum húsast í hesum seks eindum: í Kongagøtu (garðinum hjá Frk. Cohr), í Fríðrik Petersens gøtu, við Landavegin, á Frælsinum/Handan Á, á Argjavegi og í Gundadali.

Frá februar 2018 fer ein stova at vanta í í Gundadali, tí skúlin skal úr gamla húsinum hjá Fótbóltssambandinum. Í gamla húsinum er ein 8. flokkur, tað er ikki pláss fyri honum í hølunum, sum verða leigað í bygninginum hjá Fótbóltssambandinum.

Næmingatalið í komandi 9. 8. og 6. árgangi. er ov høgt. Hesir árgangir hava verið fýra spor, tá skúlarnir vórðu lagdir saman og so koma tvey spor aftrat úr Sankta Frans skúla, sostatt er neyðugt við hølum til ávikavist fýra og seks flokkar í hesum árgangum.

Tað er tørvur á einum høli á uml. 20 $m^2$ í veghædd til Litir í Leiki, tí tað riggar ikki so væl, at frítíðarskúli og Litir í Leiki hava tað eina fyribilshølið í Kongagøtu í felag, tí har eru stór og dýr ljóðføri inni.

Sum er, er skúlin á  nógvum matriklum, so tað er ikki ein loysn at finna høli aðrastaðni enn, har skúlin er framman undan. Skúlin hevur víst á møguleikan at fáa Realskúlan aftur, nú Heilsuhúsið flytur haðani.

Skúlastjórin hevur sent uppskot um eina loysn. Sambært hesum uppskoti, fær Skúlin á Fløtum  Realskúlan, og hann verður so brúktur til 3. flokk, og soleiðis verður øll grunddeildin savnað í Kongagøtu. Í hesum bygningi er eisini pláss fyri virkseminum hjá Litum í Leiki, sum nú er í tí eina fyribilshølinum í garðinum hjá frk. Cohr. Um forskúli verður stovnaður skúlaárið 2019/2020 hevði kanska borið til, at hann var í Realskúlanum saman við fyrsta flokki. Men ivasamt er, um tað er nóg gott pláss til tríggjar flokkar aftrat í bygninginum.

Um bert ein árgangur verður í Realskúlanum, so er pláss til annað virksemi eisini t.d. býarsavn.

Um skúlin fær ein part av Realskúlanum, soleiðis at pláss er fyri einum árgangi og Litum í Leiki har, so ber til at flyta úr Gundadali og siga leigumálið upp. Sambært leigusáttmálanum kann leigumálið tó í fyrsta lagi sigast upp til 01.04.2019.

Skúlin metir ikki, at tað er so umráðandi, at fótbóltsflokkarnir hava høli í Gundadali, tí tað er gott busssamband og lætt at koma aftur og fram í sambandi við undirvísing og venjing á vøllunum í Gundadali.

Útreiðslurnar til leigu fyri hølini í Gundadali eru 24.540 kr. um mánaðin. Um tað ber til at siga leigumálið upp til juli 2018, so kann skúlin byrja at flyta, tá skrivligu próvtøkurnar eru síðst í mai og flyta útgerð og innbúgv úr hølunum. Skíggjar og talvur verða so settar upp í Kongagøtu, og neyðugt er ikki við nýíløgu til útgerð og innbúgv.

Skúlin og frítíðarskúlin hava skrivstovu í Móttøkuhúsinim, og heilsufrøðingurin hevur eisini høli har. Um skúlin fær høli í Realskúlanum, ber væntandi til at flyta úr Móttøkuhúsinum. Skrivstovurnar kunnu kanska vera á loftinum og heilsufrøðingurin í somu hølum, sum hann var í, tá skúlin var í Realskúlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti**

Foreldraumboðini í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum taka undir við uppskotinum hjá skúlaleiðsluni, at Skúlin á Fløtum fær Realskúlan at ráða yvir, og umboðini heita í teldubrævið dagfest 11. desember 2017 á Tórshavnar kommunu at bera so bandi, at tað ber til at savna grunddeildina í miðbýnum.

Í teldubrævinum frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum stendur m.a.
"Tað sum vit meta vera serliga átrokandi í hesum uppskoti er, at skúlin fær hølini í Realskúlanum saman við bygningunum í Kongagøtu at ráða yvir.
Vit meta, at tað er neyðugt at savna alla innskúlingina og tilboðini, ið eru tengd at henni, á einum stað.
Her hugsa vit um frítíðarskúlan, ein møguligan komandi forskúla, Litir í Leiki og at 1.-3.fl. ið náturliga hoyra saman, eru staðsettir saman."

Umsitingin metir ikki, at Realskúlin er egnaður til ein árgang á tríggjar flokkar umframt forskúla og mælir tí frá at skipa forskúla har.

3. flokkur skúlaárið 2018/2019 var í eindini á Frælsinum í fyrsta flokki, er fluttur í eindina Kongagøtu hetta skúlaárið og skal so flyta aftur næsta skúlaár, um skúlin ikki fær høli í Realskúlanum. Um so verður, verður skúlin á somu matriklum um nú, og 3. flokkur fer so væntandi í eindina í Fríðrik Petersensgøtu.

Uttan mun til hvat annað virksemi verður í Realskúlanum er umráðandi, at Litir í Leiki fær eitt høli í bygninginum, og hølið má vera í veghædd.

Tá 8. F skal úr gamla FSF húsinum í vár, flytur hann í eindina á Frælsinum. Tað er ikki besta loysnin, tí har verður hann saman við miðdeildini, tað sum er eftir av hesum skúlaárinum.

Um Skúlin á Fløtum fær Realskúlan, eru tveir møguleikar. Annar er at siga leigumálið við Fótbóltssambandið upp, og hin er, at skúlin fer úr eindin í Fríðrik Petersensgøtu, sum so kann brúkast til okkurt annað virksemi. Verður leigumálið sagt upp, so verða skúlaárið 2018/2019 fýra flokkar í eindini í Fríðrik Petersensgøtu. Tað verða ítróttaflokkarnir, sum verða tveir 8. flokkar og tveir 9. flokkar. Hinir flokkarnir í hesum árgangum verða antin í eindini á Frælsinum ella í eindini á Argjavegi. Skúlin hevur ikki tikið endaliga støðu til tað enn.

Til tess at fremja hesa ætlan, er neyðugt við ávísum tillagingum í bygninginum. Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03897 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða ætlanina við skúla í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.

**Ískoyti**
Síðan seinasta fund er komin teldupostur frá foreldraumboðunum í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum við áheitan at lata Skúlan á Fløtum hava økið við Kongagøtu og Realskúlan í tvey ár afturat. Teldupostur dagfestur 24. januar 2018 við áheitanini er hjálagdur.

Umsitingin vísir til mál um bráðfeingis plásstørv á dagstovnøkinum j.nr. 17/03897, har avgjørt er, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leik hjá Skúlanum á Fløtum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin lata nevndini skrivið til kunningar.

**Mentamálanevndin 06. februar 2018:** Útsett.

**Mentamálanevndin 08. februar 2018:** Samtykt at heita á umsitingina at kanna møguleikan fyri at hýsa 3. flokki í Skúlanum á Fløtum í umhvørvinum við Kongagøtu og Finsen.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur kannað møguleikan at finna onnur høli í nánd av Skúlanum í Kongagøtu, soleiðis at øll grunddeildin í Skúlanum á Fløtum kann verða á einum stað.

Hølini í kjallaranum í Finsen út móti Tórsgøtu, sum eru ætlað til café, eru ikki tikin í nýtslu enn. (Tekning er hjáløgd). Har eru nøkur arbeiði, sum ikki eru liðug, t.d. ljós, el-stikk, radiatorar, partur av gólvinum og okkurt er eftir at mála. Samskifti er við Bústaðir um, at hesi arbeiðið verða gjørd. Haraftrat verður neyðugt at gera skilaveggir í café-økinum – ein við dupulthurð, ið býtir høli í tvey og ein út móti gongini. Hølini til undirvísing mugu lúka vanlig krøv til ljóðviðurskifti.

Um møguligt verður at leiga hesi høli til Skúlan á Fløtum, er neyðugt, at skúlin eisini fær høli 1.01 í Realskúlanum til undirvísing.

Ætlanin er, at tveir flokkar verða í Finsen og ein í Realskúlanum, og at Litir í Leiki kunnu so haraftrat brúka 1.01, tá flokkurin ikki brúkar tað hølið, og haraftrat gomlu sangstovuna í Finsen.

Í kjallaranum í Finsen verða tvey flokshøli (café-økið verður býtt sundur til tvey flokshøli), og gongin verður brúkt til felagsøki. Høvuðsinngongdin verður í tunlinum undir Auluni í Finsen, og hølið, sum er avmerkt til starvsfólk verður brúkt til bólka- og samrøðurúm. Hølið sum er avmerkt til inngongd til sunnaru stovuna.

Hølini mugu vera klár til undirvísing 15. august í 2018. Innbúgv og kt-útbúnaður skal bíleggjast. Veitingartíðin er uml. tríggjar mánaðir og uppsetingin eini tvær vikur, sostatt er neyðugt, at hølini eru klár 1. august.

S

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Tekstur kemur týsdagin.

**kúlin útvegar innbúgv og talvur til hølini í Realskúlanum og talvur til hølini í Finsen.**
**Mentamálanevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Ískoyti**
Bústaðir bjóðar kommununi at leiga høli í Finsen til Skúlan á Fløtum. Leigumálið er fyri tvey ár. Leigukostnaður er ikki endaliga ásettur.

Litir í Leiki heldur í løtuni til í sangstovuni í Finsen, og tí er undirvísingin hjá Musikkskúlanum í kontrabassi eisini flutt úr fyribilshølunum í garðinum hjá Frk. Cohr og í sangstovuna í Finsen.

Um skúlin fær høli í Finsen og eitt høli í Realskúlanum, so øll grunddeildin verður savnað í umhvørvinum við Kongagøtu, eru tríggir møguleikar lýstir niðanfyri, um hvussu skúlin kann skipa grunddeildina.

*a. Fyrsti flokkur í Finsen*
Skúlaárið 2018/2019 eru 46 nemingar skrivaðir inn í fyrsta flokk í Skúlan á Fløtum, og er tað bert grundarlag fyri tveimum flokkum. Sostatt ber til, at fyrsti árgangur verður í hølunum í Finsen, og hinir báðir árgangirnir í grunddeildini verða verandi í Kongagøtu. Skúlin á Fløtum fær so eingi høli í Realskúlanum, og Litir í Leiki heldur fram í sangstovuni.

Vansin við hesi loysn er, at hon forðar fyri møguleikanum at stovna ein flokk aftrat í Skúlanum á Fløtum, um so skuldi verið, at nemingatalið veksur, og Mentamálaráðið játtar kommununi at stovna ein flokk aftrat í hesum árgangi.

Ein annar vansi er, at klædnagoymslan hjá frítíðarskúlanum er í Kongagøtu.

Aftrat hesum kemur, at skúlin hevur roknað við at kunna brúka starvsfólkarúmið í Kongagøtu til starvsfólk burtur av og ikki til serundirvísing, fundir o.a. Tí við hølunum í Finsen og í Realskúlanum var møguleiki at brúka tað eina undirvísingarhølið til serundirvísing, bólkarúm, fundir o.a.

Í Finsen er eitt rúm í lonini út móti Sjúrðargøtu, sum kann verða brúkt til serundirvísing. Vansin við tí er, at børnini skulu út fyri at koma til hølið. Tað er tó beint tvørtur um garðin, so úr skúlastovunum í Finsen er talan bert um at fara tvørtur um garðin, men úr bygninginum í Kongagøtu er nakra longri, og talan er jú um ta yngstu deildina í skúlanum.

*b. Triði flokkur í Finsen og Realskúlanum*
Nemingatalið 2018/2019 í triðja árgangi er 61, og talan er sostatt um tríggjar flokkar.

Fyrimunir eru, at 3. árgangur verður i Finsen og í 1.01 í Realskúlanum, tí hann er tann elsti árgangurin, kennir umhvørvið væl, megnar best at flyta seg í umráðnum, fara til felagstiltøk í bygninginum í Kongaøtu og fara oman í útiøkið hjá skúlanum og Grasagarð, hóast tað er eitt sindur longri at fara enn úr bygninginum í Kongagøtu.

Her ber eisini væl til at gera royndina, at tann eini flokkurin, Litir í Leiki-næmingarnir, verða í Realskúlanum í eini stovu við vanligum innbúgvi, sum skúlin tekur við úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu. Møguleikin er so at gera royndir við øðrvísi innbúgvi í Finsen og brúka royndirnar frá tí, tá innbúgv verður keypt til nýggja bygningin úti á Fløtum.

Um 3. árgangur verður í Finsen og Realskúlanum, verður eitt flokshøli tøkt í Kongagøtu, sum so kann verða brúkt til serundirvísing, bólkarúm, fundarhøli o.a. Hesi høli mangla í eindini í Kongagøtu.

Vansarnir við hesi loysn eru, at 3. árgangur ikki er savnaður í sama bygningi, og at tann eini flokkurin heldur til í hølum í einum bygningi, sum ein dagstovnur er í. Tað er ivasamt, um tað er sambæriligt, at skúli og dagstovnur húsast í sama bygningi og so tætt hvørjum øðrum.

*c. Triði flokkur í Finsen*
Tað ber til at savna 3. árgang, um skúlin umframt hølini við caféøkið fær hølið í Finsen á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta til flokshøli. So verða allir tríggir flokkarnir í hesum árgangi á sama stað, og loysnin við hesum hølum gevur møguleika fyri betri samanhangi, tí hølini eru í sama bygningi, á somu hædd og inngongdin er úr sama tunli.

Við hesi loysn verður eisini tað eina hølið í Kongagøtu tøkt, og tað ber til at skipa serundirvísingsøkið har og bøta munandi um starvsfólkaviðurskiftini, soleiðis at starvsfólkarúmið verður starvsfólkarúm burtur av.

Henda loysnin ávirkar hølisviðurskiftini hjá Listgrafiska verkstaðnum, sum ætlanin var skuldi halda til í Finsen í hølinum á horninum móti Tórsgøtu/Sjúrðargøtu. Her er tó annar møguleiki, har Listgrafiska verkstaðið fær onnur høli í ovaru fimleikahøllini og tilhoyrandi hjáhølum í Finsen, sum ætlaði eru til myndlistaverkstøð (sí mál 17/01361).

*Annað*
Uttan mun til hvør loysnin verður, er neyðugt, at Litir í Leiki framhaldandi kann nýta sangstovuni í Finsen, til skúlin flytur á sumri 2020.

Tað verður ikki neyðugt at játta eyka til útreiðslur til el og hita til hølini í Finsen, tí skúlin hevur játtan til eindina í Fríðriks Petersensgøtu, og tær útreiðslurnar hevur skúlin ikki, tá hann flytur úr bygninginum.

Skúlin tekur ikki undir við loysn a: at fyrsti flokkur er í Finsen. Við hesi loysn missir skúlin munandi meir enn hann fær, sostatt gevur tað ikki meining at flyta úr eindini í Fríðriks Petersensgøtu, og skúlin vil so heldur halda fast við bygningin í Fríðriks Petersensgøtu. Tað triðja undirvísingarhølið er ein treyt, sum skúlin heldur fast við. Haraftrat metir skúlin, at tað er rættast, at fyrsti og annar árgangur eru í Kongagøtu, tí teir árgangirnar ganga í frítíðarskúla, og frítíðarskúlin brúkar eisini hølini í Kongagøtu.

Skúlin tekur heldur ikki undir við loysn b: at triði árgangur er í Finsen og í hølinum 1.01 í Realskúlanum, tí skúlin metir, at avbjóðingarnar við, at skúli og dagstovnur eru í sama bygningi, og hølini eru síð um síð, eru ov stórar.

Skúlin tekur undir við loysn c: at 3. árgangur fær caféøkið og hølið á horninum Tórsgøta/Sjúrðargøta í Finsen.

Skúlin leggur dent á, at hølisviðurskiftini hjá starvsfólkunum í Kongagøtu eru ikki í lagi, tí serundirvísing, starvsfólkarúm og fundarhøli eru í sama høli, eitt høli sum er 20 $m^2$ . Nú bert

tveir 1. flokkar verða í Skúlanum á Fløtum, ber til at bøta um hesi viðurskifti við at skipa alt serøkið í eindini í Kongagøtu í einum flokshøli í Kongagøtu.

Samanumtikið tekur skúlin hvørki undir við loysn a ella b, skúlin tekur undir við loysn c., og um tað ikki ber til at fáa triðja flokshøli í Finsen, ynskir skúlin at verða verandi í Fríðriks Petersensgøtu.

Við loysn c. verður bygningurin í Fr. Petersensgøtu 9 tøkur til annað endamál.

Um avgjørt verður at fremja ætlanina at savna triðja árgang í Finsen, verður tørvur á fígging til ymiskt innbúgv o.a., umframt til leigukostna til Bústaðir fyri hølini. Leigukostnaðurin verður væntandi tøkur til fundin mánadagin. Til ein komandi fund kemur tilmæli um, hvussu útreiðslurnar kunnu fíggjast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at savna triðja árgang í Finsen og at farið verður undir endaligar samráðingar við Bústaðir um avtalu í Finsen um leigu og ávísa innrætting av hølunum í caféøkinum og at leggja málið fyri aftur til komandi fund.

Tórshavnar kommuna útvegar innbúgv, amboð og gardinur til flokshølini í Finsen, innbúgv til

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
karnapparnar, mottir og gaderobu við inngongdina. Kostnaðarmetingin fyri hetta er 300.000 k

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.
r.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Samráðingar hava verið við Bústaðir um innrætting og leigu, hølini talan er um eru 250 $m^2$. Uppskot er, at leigan verður 925 fyri $m^2$, hetta íroknað útreiðslurnar, ið Bústaðir hevur at innrætta hølini til skúlabrúks. Hølini í Finsen verða klár í august 2018. Innrættingarætlanin er góðkend av byggivaldinum.

Kostnaðarmeting til innbúgv skúlastovur, karnappar, garderobu, næmingaskáp, skáp til goymslu, gardinur og mottur er 300.000 kr. Ætlanin er, at hetta innbúgvið verður brúkt aftur í bygningin úti á Fløtum, tá skúlin flytur út hagar í 2020. Ætlanin er at keypa tvey ymisk sløg av stólum til næmingar umframt nøkur einkultborð, nøkur dupultborð og nøkur bólkaborð, so alt innbúgvið ikki er sama slag. Hetta gevur møguleika at innrætta stovurnar ymiskt, og at laga innbúgvið til ymsan tørv og ymiskt virksemi.

Av tí, at innbúgvið tvs. borð, stólar, skáp verður brúkt aftur í Skúlanum á Fløtum, verður mælt til at játta 300.000 kr. av játtanini til verkætlanina av 4176 Nýbygging skúlar (L41012).

Útreiðslurnar til leigu í 2018 eru 96.350 kr., tær verða býttar millum 4117 Skúlin á Fløtum og 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Í fíggjarætlan 2019 verður so lagt upp fyri, soleiðis at

útreiðslurnar til leigu eru á játtanini hjá Skúlanum í Fløtum, og skúlin fær kompensatión fyri tann partin av leiguni, sum skúlin hevur goldið frá august til desember 2018.

Uppskot til leigusáttmála verður tøkt mánadagin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja

a) At gera leigusáttmála við Bústaðir um hølini í Finsen til skúlabrúks
b) At játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum

og beina punkt a) í fíggjarnevndina og punkt b) í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Leigan fyri kjallaran í Finsen verður ætlandi greið innan medio mars. Ætlandi skal møguliga l

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, sum eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, mæla til at finna eina loysn fyri Listagrafiska verkstaðið, áðrenn støða verður tikin til hetta mál.
eigumálið byrja 1. juli 2018.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Býráðslimirnir Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein skjóta upp, at Skúlin á Fløtum sleppur at disponera yvir gamla Realskúla, soleiðis at 1.-3. flokkur kann húsast í skúlanum í Kongagøtu og í Gamla Realskúla.

Ætlanin um at innrætta Gamla realskúla til dagstovn eigur tí at verða endurskoðað soleiðis, at frítíðarskúli verður staðsettur á øðrum staði. Alt hetta so leingi sum byggingin av skúlanum á Fløtum er ávegis. Tá ið Skúlin á Fløtum flytir út á Fløtir, er støðan ein onnur.

Grundgevingar okkara fyri hesum uppskoti til viðgerðar og avgerðar er, at vit halda at Skúlin á Fløtum eigur rætt til at nýta Gamla realskúla. Talan er í hesum føri um tíðaravmarkaða loysn, sum eisini gevur Býráðnum stundir til at finna út av endaliga, hvat Gamli realskúli skal brúkast til.

Vit taka at heilum huga undir við, at Skúlin á Fløtum skal kunna hýsa 1.-3. flokk í hølum kring Gamla Kommunuskúlan, og samstundis vilja vit vísa á ta sannroynd, at íbúgvarnir í Finsen ikki halda tað vera eitt gott hugskot at skúli flytir inn í kjallaran har.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Atkvøtt varð um ískoytið frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Heðini Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndi Sigurðsson og Annfinn Brekkstein til býráðsfundin 20. juni 2018, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt  á fundi mentamálanevndini 14. mai 2018 og samtykt í fíggjanevndini 18. mai 2018. Nevndirnar hava samtykt at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og fíggjarnevndini og samtykkja at játta 300.000 kr. av 4176 Nýbygging skúlar (L41012) á konto 4117 Skúlin á Fløtum.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt**.**

# 216/18 Uppskot um avtalu við Fjølrit um nýtslu av vardum verkum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.08.2018 | 251/18 | 18/00115-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 257/18 | 18/00115-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 216/18 | 18/00115-5 |

**Upprunin til málið:**
Áheitan frá Fjølrit at gera avtalu um nýtslu av vardum verkum.

**Lýsing av málinum**
Fjølrit er felagsskapur, sum er góðkendur sambært § 40 í upphavsrættarlógina til at umsita rættindi hjá upphavsrættarfólki og er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavarar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.

Kommunufelagið hevur samskift við Fjølrit um avtalu og hevur gjørt eitt uppskot til standardavtalu. Nakrar kommunur ætla at leggja avtaluna fyri kommunustýrini at taka støðu til. Higartil hevur bert Runavíkar kommuna skriva undir avtaluna.

Sambært uppskotinum til avtalu verður gjaldið 200 kr. fyri hvønn næming í fólkaskúlunum í kommununi. Næmingatalið í Tórshavnar kommunu er uml. 3.000, sostatt er tørvur á 600.000 kr., og verður avtalan undirskrivað, er neyðugt at játta hesa upphædd á kontu 5313 Gjøld til rættindi. Á kontu 5313 er játtan til Sprotan og Koda.

Uppskot til fyribils avtalu við fjølrit er hjálagt.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2015 um upphavsrætt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja hjáløgdu standardavtalu at galda í eini royndartíð á tvey ár frá 1. januar 2019.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja, at í fíggjarætlan 2019 verða 600.000 kr. játtaðar aftrat á kontu 5313 Gjøld til rættindi og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina..

**Mentamálanevndin 27. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 217/18 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 34/18 | 16/00962-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 12/18 | 16/00962-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 27/18 | 16/00962-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 17/18 | 16/00962-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 28.02.2018 | 79/18 | 16/00962-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 28.02.2018 | 63/18 | 16/00962-1 |
| 13 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 38/18 | 16/00962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 258/18 | 16/00962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 217/18 | 16/00962-1 |
| 16 Mentamálanevndin | | | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:
- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:
- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**

Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:
- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa byggingina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í

partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallarbyggingina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.
**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og  Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:
Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión uppá bygging av tribunum og bygnigni á vestursíðuni á Tórsvølli var 31. august 2017. J&K Petersen hevði lægsta boð kr. 88.499.385 handverkaraútreiðslur. Samráðst hevur síðani verið við arbeiðstakaran um tilboðið.

Harumframt er hetta tíðarskeiðið arbeitt nærri við konstrutkiónspartinum, har tað í mun til útbjóðingartilfarið er farið frá upprunaligu loysnini við betongveggi niður á hellu millum Tórsvøll og Niðara vøll til spunsvegg, sum mett verður er ein tryggari loysn. Gjørdar eru í hesum sambandi neyvari dýpdarkanningar. Har tað er djúpast eru 7,5 metrar. Spunsveggirnir verða slidnir niður eins og kent er frá havnagerð, og so verður stoypt í erva og harfrá bygt fast í sjálvt skýlið.

Staðfesta dýpdin niður á hellu og spunsveggirnir hava gjørt verkætlanina dýrari. Gjøgnumgongd hevur somuleiðis verið við ymisku fakini saman við høvuðsarbeiðstakara við tí endamáli at fáa prísin niður. Eftir hesar broytingar og samráðing eru handverkaraútreiðslurnar kr. 90.325.687.

Samlaður kostnaður íroknað byggiharraútreiðslur, ráðgeving, innbúgv, reinsiverk v.m. er kr. 118.569.663.

Við støði í hesum kostnaðinum er gjørt nýtt uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya um bygging av vestursíðuni, har útreiðslukarmurin er kr. 118,5 mió, og har báðir partar rinda kr. hvør sín helming tó soleiðis, at parturin hjá Tórshavnar kommunu er í mesta lagi kr. 59,285 mió.

Áður eru játtaðar kr. 10 mió til verkætlanina árini 2016 og 2017. Fíggjartørvurin hjá kommununi er sostatt kr. 49,285 mió, sum sambært uppskotinum til samstarvsavtalu við

Fótbóltssambandi Føroya verður at fíggja yvir íløguætlanina árini 2019-2025 soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |
| 2025 | kr. 1,785 | mió |
| | kr. 49,285 | mió |

Sambært tíðarætlanini verður byggingin liðug í oktober 2020. Byggingin verður eins og undanfarna byggistig skipað í partalagi. Umframt partalagssáttmála skal støða takast til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við J&K Petersen, samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya og fígging.

Býráðið samtykti 16. juni 2016, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum Tórshavnar kommunu og Fótbóltssamband Føroya verður tikið upp til nærri støðutakan. Upplýsast skal, at ítøkiligt uppskot er gjørt um slíkt býti, harundir uppskot um rakstrar- og samstarvsavtalu fyri Tórsvøll. Uppskotið verður lagt til politiska viðgerð í mentamálanevndini á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- Góðkenna uppskotið til partalagssáttmála
- Góðkenna uppskotið til høvuðsarbeiðstakarasáttmála
- Góðkenna uppskotið til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya
- At játta kr. 5 mió av tøkum løgukarmi 2017 konta 5775 Ítróttaranlegg L00001 til løgukontu 5775 L57026 Tórsvøllur vestursíðan
- At játta í alt kr. 49,285 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025 samsvarandi samstarvsavtaluni við Fótbóltssamband Føroya,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at upphæddin, ið kommunan skal rinda, í málslýsingin er uttan mvg. Við mvg er upphæddin kr. 62,990 mió, fíggjartørvurni tó 52,990. Býtið í yvir ár verður so hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 2019 | kr. 6,000 | mió |
| 2020 | kr. 8,500 | mió |
| 2021 | kr. 8,500 | mió |
| 2022 | kr. 9,000 | mió |
| 2023 | kr. 7,500 | mió |
| 2024 | kr. 8,000 | mió |

| | | |
|---|---|---|
| 2025 | kr. 5,490 | mió |
| | kr. 52,990 | mió |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin vísir til tilmælið omanfyri við teirri broyting, at játtaðar verða í alt kr. 52,990 mió á íløguætlanini fyri 2019-2025.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 25. januar 2018 samtykti býráðið at góðkenna uppskot til partalagssáttmála, at góðkenna uppskot til høvuðsarbeiðstakarasáttmála, og at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við Fótbóltssamband Føroya, og í hesum sambandi at játta kr. 62,990 mió íroknað kommunalt mvg til byggingina av vestursíðuni á Tórsvølli.

Eftir hesa býráðssamtykt hevur FSF boðað kommununi frá samtykt í starvsnevnd FSF´s um, at FSF vil broyta byggiverkætlanina soleiðis, at verandi FSF-hús á vestursíðuni ikki verður út- og umbygt sum ætlað, men ístaðin verður tikið niður og at nýtt hús verður bygt uppaftur á staðnum.

Endamálið við hesi broyting er at fáa eina betri bygging bæði viðvíkjandi innrætting og funktiónum. Fyrimunur er eisini, at hæddirnar á vestursíðuni verða bundnar saman við suðurendan í somu linju, tí meðan verandi bygningur hevur fýra hæddir, verður tann nýggi at hava tríggjar hæddir eins og suðurendin.

Harumframt minkar broytta ætlanin munandi um váðan í byggingini serliga við atliti at avbjóðandi lendinum.

Fótbóltssambandið hevur í hesum sambandi boðað kommununi frá, at mettur meirkostnaður fyri hesa ætlan er kr. 25,0 mió, og at Fótbóltssambandið sjálvt vil fíggja henda meirkostnað. Fíggjarligi parturin hjá Fótbóltssambandinum av samlaðu byggingini á vestursíðuni verður eftir hesum uml. kr. 84,3 mió.

Hetta merkir tó, at verkætlanin er ikki heilt tann sama, sum býráðið samtykti á síðsta fundi út frá fyriliggjandi skjølum.

Í sambandi við fyrireikingarnar at prosjektera vestursíðuna varð henda ætlan at byggja nýtt hús heldur enn at út- og umbyggja verandi hús viðgjørd. Semja var um, at hetta er ein uppá allar mátar betri loysn, men hon kundi ikki fremjast innanfyri tann fíggjarkarm, ið verkætlanin tá hevði.

Nú Fótbóltssambandið hevur samtykt at fíggja hesa broyting, verður mælt býráðnum til at broyta verkætlanina soleiðis sum lýst omanfyri, harundir at broyta tilhoyrandi partalagssáttmálan, høvuðsarbeiðstakarasáttmálan og samstarvsavtaluna við Fótbóltssambandið, men har játtanin hjá kommununi framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at samtykkja verkætlanina soleiðis broytt og at tilhoyrandi skjøl – partalagssáttmáli, høvuðsarbeiðstakarasáttmáli og samstarvsavtala við Fótbóltssambandið verða broytt samsvarandi. Harumframt verður mælt til at staðfesta, at játtanin hjá kommununi til byggiverkætlanina á vestursíðuni á Tórsvølli framhaldandi verður ikki hægri enn tær kr. 62,990 mió íroknað mvg, sum longu eru játtaðar.

**Mentamálanevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til samstarvsavtaluna millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu grein 5 um fíggjarligu viðurskiftini. Sambært hesum rindar kommunan sín part av íløgukostnaðinum í pørtum soleiðis, at í 2025 er alt goldið. Byggingin er ætlað at verða liðug í 2020/21.
Fótbóltssambandið hevur sent fyrispurning til kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari. Fótbóltssambandið greiðir frá, at til tess at fíggja bygginginа, bæði meðan bygt verður og árini fram til 2025, noyðist Fótbóltssambandið at taka upp lán fyri partin hjá kommununi, ið ikki er goldin.
Í hesum sambandi er Fótbóltssambandið í gongd við at kanna tilboð frá fíggjarstovnum. Greitt er, at Fótbóltssambandið skal bera týðandi fíggjarkostnaðir av hesum. Lagt verður aftrat, at Fótbóltssambandið virðir avtaluna og góða samstarvið við kommununa um Tórsvøll, men loyvir sær at spyrja kommununa, um til ber at gjalda kommunala partin skjótari.
Sbrt. grein 5 í avtaluni, so kann kommunan gjalda gjøldini skjótari. Higartil hevur kommunan veitt 10 mkr. í fígging av 62,990 mkr. Uppskot hjá Fótbóltssambandinum er, at kommunan t.d. rindar 33 mkr. nú ella næsta ár, og restina 19,990 mkr. árini 2020-21, so at byggingin verður ikki verður óneyðuga dýrkað av fíggjarkostnaðum.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at broyta gjøldini soleiðis, at 33 mkr. verða játtaðar í 2018 av tøkum peningi. Harumframt verður mælt til at játta 10 mkr. av íløgujáttanini fyri 2020 og 9,990 mkr. í íløgujáttanini fyri 2021.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 218/18 Nýggj serstøk byggisamtykt við Dalavegin, matr. nr. 864a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 68/18 | 18/01173-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 92/18 | 18/01173-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 180/18 | 18/01173-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 218/18 | 18/01173-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt útstykking á matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g og 864h við Dalavegin, Tórshavn. Av tí at tey flestu grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$ til støddar, skal serstøk byggisamtykt gerast.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Samlaða víddin á útstykkingini er uml. 6900 $m^2$. Søkt er um at útstykkja 12 grundstykkir – 9 til stakhús og 3 við møguleika fyri at byggja tvíhús. Harumframt er fríøki, gøtusamband, felags p-pláss og øki til reinsiverk.

Grundstykkini verða millum 400-700 $m^2$ til støddar og fríøkið verður uml. 700 $m^2$.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/03444 – Útstykking á matr. nr. 864a, við Dalavegin í Tórshavn

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin mælir til at góðkenna uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt við Dalavegin og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við almennu hoyringina um uppskot um nýggja serstaka byggisamtykt við Dalavegin hevur Tórshavnar kommuna fingið eitt mótmælisskriv. Umboð fyri grannaognirnar seta í høvuðsheitum fram hesar viðmerkingar og sjónarmið í mótmælisskrivinum:

- Fýlst verður á, at verandi tilfar er ógreitt og ófullfíggjað, og at eingin verulig grundgeving er fyri broytingina av byggisamtyktina. Byggivaldið eigur at fylgja galdandi reglum og at gera sjálvstøðugar fakligar metingar.

- At talan er um vánaliga borgaratænastu og vánaligan fyrisitingarsið, at umsitingin ikki vendir sær beinleiðis til grannarnar, sum verða ávirkaðir av broytingini, og at talan er um eina almenna hoyring við stuttari freist.

- Talan er um eina broyting, sum minkar um virðið hjá grannunum. Harafturat verður týdningurin av byggisamtyktum lagdur fram, og víst verður á, at tílík útstykking og bygging, sum talan er um, er í mótstríð við endamálið at broyta eina byggisamtykt uttan eina fullgóða grundgeving.

- Økið vestanfyri Dalavegin er sermerkt við nýggjum vælgjørdum sethúsum, og hava tey gjørt íløgur í bæði hús og grundstykkir, har byggingin er tillagað verandi byggisamtykt, sum nú er ætlanin at broyta, og ikki er hóskandi at byggja tvíhús tætt upp at hesum húsum.

- At byggingin upp at matr. nr. 864o, 864k, 866e og 866d verður sera tøtt, tí at hesi húsini longu eru bygd tætt við markið. Umframt at grannar á matr. nr. 868c, 868d, 868e og 868f fara at missa útsýnið, serliga tí talan er um smærri grundstykki og tvíhús.

Umsitingin hevur viðgjørt mótmælið, og eru viðmerkingar og sjónarmið ikki grundað á galdandi reglur og byggisamtyktir, sum sipað verður til, tí talan er ikki um eina broyting av verandi byggisamtykt, men um eina nýggja serstaka byggisamtykt.

Økið, ið talan er um, liggur í umráðispartinum A1, og sambært ásetingunum fyri umráðispartin eru hesar ásetingar galdandi:

1. *"Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús...".*

2. *"Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil."*

3. *"Útstykking verður einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, og tá ið byggibúningin annars er tryggjað sambært vanligu útstykkingartreytum kommununnar."*

Byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt nýggja útstykking á matr. nr. 864a, 864e, 864f, 864g og 864h við Dalavegin, og av tí at tey flestu grundstykkini er minni enn 500 $m^2$ til støddar, skal serstøk byggisamtykt gerast, og verður hetta gjørt við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954. Talan er um eina nýggja serstaka byggisamtykt, sum er grundað á eina góðkenda útstykkingarætlan. Byggivaldið fylgir tískil eisini galdandi reglum.

Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at skipa bústaðarbygging á økinum, sum frammanundan liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er øki ætlað til bygging. Grannar í økinum kunnu tískil ikki tryggja sær frítt útsýni, og at hús ikki verða bygd tætt upp at teirra matrikli.

**Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013**
***§ 6. 1)*** *Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mugu verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum.*

Øllum er tryggjað smbr. §6 í byggi- og býarskipanarlógini, at koma til orðanna og gera mótmæli til ætlaðar broytingar. Sostatt kunnu grannar og onnur blíva hoyrd, nevniliga við at gera síni møguligu mótmæli galdandi. Í hesum máli lá uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt frammi alment frá 30. apríl til 11. juni 2018.

Broyting í byggisamtyktum og uppskot til nýggjar serstakar byggisamtyktir eru at meta sum eitt reguleringsamboð og ikki ein vanlig fyrisitingarlig avgerð. Harvið verður tryggjað við lóg, at allir viðkomandi aktørar verða “hoyrdir” í tíðini, har broytingin liggur frammi alment. Tí verða broytingar av byggisamtyktum ikki sendar ávísum borgarum til hoyringar, men til allan almenningin til viðmerkingar.

*“Á vanligan hátt kunngera”* verður lisið sum kunngera á heimasíðu, skal lýsast í avísum og framløgd í fysiskum formi á t.d. Snarskivuni. Tað eru eingi formlig krøv til t.d. at sendast skal skriv til ávísar borgarar. Tað at broyta eina byggisamtykt er at meta sum eitt reguleringsamboð og kann samanberast við ”lóggávubroyting” og rakar yvirskipað.

Feilur var í tilfarinum til almennu hoyringina, tí okkurt skjali vantaði, men talan var ikki um skjal, sum kundi havt ávirkan á tað, sum mótmælt varð um. Tað er tó sera óheppið, at tilfarið ikki var fullfíggjað, sum somuleiðis verður víst á í mótmælisskrivinum. M.a. av hesi orsøk verður mælt til at leggja málið til almenna hoyring av nýggjum

**Aðrir upplýsingar frá umsitingini:**
Ein partur av Stóragarði er á økinum, har nýggja útstykkingarætlanin er ætlað. Grótgarðurin í økinum er áleið 75 metrar, og liggur fram við markinum á fýra matriklum, ið allir eru privat ogn. Stórigarður er ikki friðaður, men ynski er lagt fram um at varðveita garðin ella partar av honum, og at kanna hvørjir møguleikar eru í hesum sambandi. Sí skjalið *Stórigarður*, sum er mál stovnað í sambandi við at varðveita garðin ella partar av honum.

Umsitingin hjá kommununi og eigararnir av jørðini eru blivin samd um at koyra eina áseting í serstøku byggisamtyktina, sum skal tryggja, at garðurin verður varðveittur. Tann ásetingin er soljóðandi:

"§2. Stk. 6. *Stórigarður er í økinum, og skal hesin varðveitast. Um grivið verður á grundøkjunum, sum deila mark við Stóragarð, skal hetta gerast í samráð við kommununa.",* sí skjal *Serstøk byggisamtykt – tekstur*.

Í skeytinum til tey grundøkini, sum liggja nærmast garðinum, verður somuleiðis víst til serstøku byggisamtyktina.

Stórigarður liggur vakur og markantur í landslagnum, og hevur søguligt virði sum avmarking til býarskipanina í Havnini. Vísandi til § 6. stk. 2 í lógini um náttúrufriðing, kunnu friðingartiltøk setast í verk í sambandi við at varðveita garðin ella partar av honum.

Í sambandi við at Stórigarður er í sama øki, sum útstykkingarætlanin við Dalavegin er, er málið sent til hoyringar hjá friðingarmyndugleikunum. Náttúrufriðingarnevndin sigur í afturskrivi, at teir fara at heita á Yvirfriðingarnevndina um at friða garðin, sí skjal *4764_001.pdf*. Yvirfriðingarnevndin er ikki komin við endaligum svari, um teir fara at friða garðin og ógreitt er, hvussu long viðgerðartíðin av einum slíkum máli er. Um Yvirfriðingarnevndin avgerð at friða Stóragarð, gera teir ásetingar viðvíkjandi bygging nær garðinum. Hugsast kann, at ein áseting er, at øll bygging innan fyri eina ávísa frástøðu frá garðinum skal sendast til hoyringar hjá friðingarmyndugleikanum.

Av tí at tað er óvist, hvussu langa viðgerðartíð eitt slíkt mál hevur í Yvirfriðingarnevndini, mælir umsitingin hjá Tórshavnar kommunu til at góðkenna serstøku byggisamtyktina fyri Dalavegin, við ásetingini um, at allur grevstur á grundøkjunum, sum deila mark við Stóragarð, skal gerast í samráð við Tórshavnar kommunu. Um Yvirfriðingarnevndin avger at friða garðin, so skulu byggimál í økinum somuleiðis sendast friðingarmyndugleikanum til hoyringar, men hettar verður avgreitt so hvørt sum umsóknir um byggiloyvi koma.

Av tí at feilur var í fyrri almennu hoyringini og ein nýggj áseting er í serstøku byggisamtyktini, verður mælt til at leggja málið til nýggja almenna hoyring.

**Løgtingslóg um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995**

*§ 6. Eftir reglunum í hesi lóg kunnu friðingartiltøk setast í verk viðvíkjandi*

*1) økir á landi, á vøtnum og áum, tá ið friðingin má haldast ynskjandi av vísindaligum ella søguligum orsøkum,*

*2) onnur økir, ið bera av í vakurleika, liggja væl fyri ella hava sereyðkennir í landslagnum, plantigróðri ella djóralívi, hava munandi týdning fyri fólk, har íroknað støð, har frítt útsýni er, niðursettar plantur, grótgarðar o.a.t., sum hevur tílíkan týdning,*

*3) einsæris landsløg, sum drangar, gjáir og gil, fossar, klettar, stórir steinar, áir, vøtn, trø og træhópar, tá friðingin tykist ynskjandi í mun til vísindaligt ella søguligt virði, vakurleika ella sereyðkennir.*

**Skjøl:**

Mótmæli til broyting av byggisamtykt við Dalavegin, journal nr. 18/01173-12
Stórigarður, journal nr. 18/01173-15.
Serstøk byggisamtykt – tekstur
4764_001.pdf,

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstøku byggisamtyktina fyri Dalavegin við ískoyti til frama fyri at varðveita Stóragarð og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. september 2018 | Blað nr.: 849 |
| | Formansins merki: |

# 219/18 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Klingrutjørn II

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 181/18 | 18/02361-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 219/18 | 18/02361-1 |

**Upprunin til málið:**
Stórur eftirspurningur er eftir grundøkjum í kommununi og farið er undir útstykkingina við Klingrutjørn II, sum er framhald av útstykkingini við Klingrutjørn I, sí skjal *Klingrutjørn II*. Í tí sambandi er uppskot um at serstaka byggisamtyktin undir Kongavarða (sum er heitið á serstøku byggisamtyktini fyri Klingrutjørn I) verður víðkað til eisini at fevna um Klingrutjørn II, og heiti á henni verður broytt til serstaka byggisamtyktin fyri Klingrutjørn, sum er eitt meira rættvísandi heiti. Somu ásetingar verða galdandi fyri Klingrutjørn II, sum fyri Klingrutjørn I.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ráðgevi kommununnar LBF P/f hevur, eftir áheitan frá kommununi, útvegað útstykkingarprosjekt til 45 grundøkir afturat, sum hvørt er uml. 400 $m^2$ til støddar. Harumframt er felags øki, felags p-pláss o.a.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingarnar fyri økið eru m.a.:

1. *Økið verður lagt til til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
2. *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
3. *Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús, 300 $m^2$ fyri tvíhús og 250 $m^2$ fyri raðhús. Ein partur av hesum kann leggjast sum fríøki, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Broytingar,* 18/02361-3
*Klingrutjørn,* 18/02361-4
*Klingrutjørn II,* 18/02361-4
*Samlað kort1,* 18/02361-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja broytingina í serstøku byggisamtyktini og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 220/18 Broyting av serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 179/18 | 18/03140-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 220/18 | 18/03140-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við ætlanir um at bygging, m.a. lestraríbúðir, á matr. nr. 919a og 919b við Marknagilsvegin/Landavegin, hevur Tórshavnar kommuna fingið umsókn um at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Marknagil.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Menningin í økinum, sum serstaka byggisamtyktin við Marknagil er, er stór – Glasir er nýliga opnað, bygging av Skúlanum á Fløtum, Musikkskúlanum o.s.f. Alt stórir, hábærsligir bygningar.

Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er øki ætlað miðstaendamálum, skúlum, almennum stovnum og íbúðum. Sambært ásetingunum fyri C3 øki er mest loyvda byggistigið 0,4 og mest loyvda nýtslustigið 0,8.

Í 2011 bleiv serstaka byggisamtyktin við Marknagil gjørd fyri økið. Sambært ásetingunum fyri øki III, sum er galdandi fyri matr. nr. 919a og 919b, er mest loyvda byggistig 0,4 og mest loyvda nýtslustigið 0,5 – altso er nýtslustigið 0,3 lægri í serstøku byggisamtyktini, enn í almennu byggisamtyktini í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu:

§ 22. Stk. 3. Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.
Stk. 4. Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.

Ásetingar áðrenn broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil fyri øki III:

§ 3. Stk. 4. Eindin skal nýtast til miðstaðarendamál, t.e. handlar, smærri stovnar, skúlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta og bústaðir.

§ 5. Stk. 4. a) Byggistigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,4.
b) Nettonýtslustigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,5.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Orsøkin til at nýtslustigið er 0,5 fyri øki III í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil er, at økið eisini liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og í almennu byggisamtyktini, sum varð galdandi í 2011, var mest loyvda nýtslustig í C3 øki 0,5. Í samband við at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu bleiv endurskoðað í 2013, varð mest loyvda nýtslustig í C3 øki broytt frá 0,5 til 0,8, sí skjal *Almenn byggisamtyktin – áðrenn endurskoðan í 2013*. Tó er serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ikki blivin endurskoðað sambært broytingini í almennu byggisamtyktini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Mál nr. 2009-0216: 04-07 Lokalplanur{serstakar byggisamtyktir – Serstøk byggisamtykt fyri økið við Marknagil – broyting av byggisamtykt (2010-2946) – Vesturskúlin.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Serstaka byggisamtyktin við Marknagil – áðrenn broyting, j.nr.* 18/03140-2
*Serstøk byggisamtykt fyri Marknagil – broytt 2018, j.nr.* 18/03140-3
*Almenna byggisamtyktin – Áðrenn endurskoðan í 2013, j.nr.* 18/03140-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta ásetingarnar fyri nettonýtslustigið fyri økispartin III í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil frá 0,5 til 0,8 og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 221/18 Íbúðarbygging undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 139/18 | 18/01973-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 184/18 | 18/01973-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 155/18 | 18/01973-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.09.2018 | 191/18 | 18/01973-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 261/18 | 18/01973-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 221/18 | 18/01973-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 26.09.2018 | 192/18 | 18/01973-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 26.09.2018 | 273/18 | 18/01973-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í miðbýnum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tað eru bygd 5 íbúðarhús Undir Kongavarða og sambært uppruna ætlanini fyri økið, so er pláss fyri trimum íbúðarhúsum afturat sunnanfyri verandi hús.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 255a, Argir, og tað ber væl til at halda áfram við byggingini av íbúðarhúsum.

Verandi íbúðarhús eru bygd av einum privatum byggiharra. Húsini eru í 6 hæddum við íalt 10 íbúðum í hvørjum húsi.

Tað er umráðandi at tey 3 punkthúsini, sum verða bygt afturat, verða gjørd samsvarandi heildarætlanini fyri alt økið. Tað vil siga at húsini í støðd koma at svara til tey húsini sum eru har og í útsjónd fella væl inn í økið.

<u>Slag av íbúðum:</u>

Dømi 1:
Allar ella minst helvtin av íbúðunum verða leiguíbúðir sum eru rørsluvinarligar og at hetta verður gjørt eftir sama leisti sum við verkætlanini 'Íbúðarbygging á Frúutrøð', í sambandi við bygging, fígging og umsiting.

Hetta merkir, at tey sum bjóða uppá verkætlanina helst eru toymi samansett við ráðgevum, umboð frá byggivinnuni, íleggjarum og møguliga eisini persónum/fyritøkum, ið kunnu umsita leiguíbúðirnar.
Verkætlanin verður boðin út alment í undangóðkenning (prækvalifikatión) og kunnu øll, sum lúka ávísar treytir, koma við eini áhugafráboðan, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá verkætlanina.
Vinnandi tilboðsgevi fær optión uppá lendið, og ein søla verður ikki framd, fyrr enn kommunan hevur góðkent eitt liðugt verkætlanaruppskot. Verður ongin verkætlan innan eitt ásett tíðarskeið t.d. 2 ár, ella um kommunan ikki kann góðkenna verkætlanina, fellur optiónin burtur og ongin søla fer fram.

Dømi 2:

At grundstykkið verður boðið út alment til at byggja 3 íbúðarhús á, sum verða í 6 hæddum, við uml. 10 íbúðum í hvørjum húsi.

Kommunan skal gera eitt útbjóðingartilfar, við ymiskum treytum, ynskjum og ásetingum um m.a.:

- Slag av bygging, stødd, útsjónd o.a.
- Vegatkoma, parkering, fríøkir, leiðingar o.a.
- Ávirkan á økið, eigarafelag o.líkn.
- Tíðarætlan fyri byggingina
- Kostnaður
- Útlutan av íbúðum
- V.m.

Á hendan hátt kann verkætlanin skjótt bjóðast út og ein byggiharri kann skjótt fara í gongd við byggingina.

Bæði dømini omanfyri stuðla væl undir visjónunum hjá kommununi um at fáa til vega fleiri bústaðir, við støði í fjølbroyttum bústaðarmøguleikum og við einum breiðum borgaraskara. Møguleiki fyri at eldri ella rørslutarnað kunnu búgva á økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í umráðispartinum A3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sambært ásetingunum ber ikki til at gera útstykkingar í A3 uttan við serstakari byggisamtykt og neyðugt er eisini við serstakari byggisamtykt fyri at byggja í 6 hæddum.

**Umhvørvisárin**
Flokkur 1

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ikki verið hjá øðrum enn.

**Skjøl**
Tekning av øki at frámatrikulera (kemur til fundin).

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at eitt passandi øki verður frámatrikulerað til at byggja 3 íbúðarblokkar á, at umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið at leggja fyri nevndina aftur, at umsitingin ger uppskot til útbjóðingartilfar eftir dømi 2 omanfyri, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskippanarnevndini og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at gera útbjóðingartilfar til íbúðarbygging undir Kongavarða.

Tað er eitt kommunalpolitiskt ynski at raðfesta leiguíbúðir og harvið ein høvuðsstað, sum rúmar ymsum fólki við ymsum tørvi. Tí er tað sera týdningarmikið at kunna bjóða ein fjølbroyttan bústaðarmarknað við bæði grundstykkjum, eigara- og leigubústøðum. Bústaðarpolitikkurin fyri Tórshavnar kommunu vísir tó á, at tað er stórur tørvur á fleiri leigubústøðum í kommununi. Fjórði hvør vil búgva til leigu, men torført er at fáa hetta at ganga upp, tí leigumarknaðurin í kommununi er sera avmarkaður.

Fyrsta verkætlan við bygging av leiguíbúðum Íbúðarbygging á Frúutrøð varð bjóðað út í vár sí Útbjóðingartilfar, j. nr. 18/00950-44. Stórur áhugi var fyri verkætlanini, men tá samanum kom, bjóðaði eingin inn. Afturmeldingar frá áhugaðum feløgum vísa á, at ov nógvar treytir vóru settar til útbjóðingina, og at hetta saman við tí yvirupphitaða marknaðinum og fullu ordrabókunum hjá byggifyritøkunum gjørdi, at vinnan lat verkætlanina fara aftur við borðinum. Tó siga feløgini, ið hava víst áhugað fyri verkætlanini, at tey framvegis eru áhugað í at byggja leigubústaðir, tó eftir tillagaðum treytum.

Kommunan sleppir tí ikki ætlanini við at fáa bygt fleiri leigubústaðir, men arbeiðir víðari við at tillaga tær ymsu útbjóðingarnar í mun til innkomnu viðmerkingar. Mælt verður tí til at bjóða verkætlanina Undir Kongavarða út til bygging av bert leiguíbúðum, og ikki sum á Frúutrøð sum ein samanseting av eigara- og leiguíbúðum, tí tað ger, at fleiri treytir mugu setast.

Ætlanin er at bjóða lendi Undir Kongavarða út við hesum yvirskipaðu treytum:
- at tað bert verða gjørdar leiguíbúðir
- at byggingin verður tillagað nærumhvørvinum eisini í mun til útsýni hjá útstykkingum omanfyri
- at keyparin letur inn eitt uppskot við treytum so sum stødd, staðseting og útsjónd á bygningum, tali og stødd á íbúðum saman við eini tíðarætlan fyri byggingini.

Umsitingin hevur gjørt eitt ávegis uppskot til útbjóðingartilfar, sí j.nr. 18/01973-13. Ætlanin er at bjóða økið út sambært treytunum í útbjóðingartilfarinum.

Privata vinnan hevur gjørt vart við, at tey ikki hava somu treytir sum Bústaðir, tá tað kemur til at keypa lendið frá kommununi. Umsitingin hevur kannað ymsu møguleikarnar í samband við útbjóðing av lendi, soleiðis at vinnan kann fáa fyritreytir, sum líkjast teimum, sum Bústaðir fáa, ella á annan hátt ger tað meira lønandi fyri vinnuna at byggja leigubústaðir. Kostnaðurin fyri lendið verður nærri lýst til fíggjarnevndarfundin.

**Skjøl**
Útbjóðingartilfar fyri Frúutrøð, j nr. 18/00950-44

Ávegis uppskot til útbjóðingartilfar_20180912, j.nr. 18/01973-13
Kort av byggiøki, j.nr. 18/01973-7
Kongavarði_Uppmátingarplanur, j.nr. 18/01973-8
Kongavarði_Tvørskurður A-A, j.nr. 18/01973-9
Kongavarði_Tvørskurður B-B, j.nr. 18/01973-10
Kongavarði_Tvørskurður C-C, j.nr. 18/01973-11
Kongavarði_Tvørskurður D-D, j.nr. 18/01973-12

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | x | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**
Fíggjarligu avleiðingarnar verða nærri lýstar til fíggjarnevndarfundin.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin ger útbjóðingartilfarið endaligt liðugt, fyri síðani at bjóða verkætlanina út, tá málið er samtykt í fíggjanevndini og býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur endurskoðað fyriliggjandi útbjóðingartilfar, sí j.nr. 18/01973-18.

Tilmæli: Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla fíggjarnevndini til at taka undir við endurskoðaða útbjóðingartilfarinum, j.nr. 18/01973-18.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við endurskoðaðum útbjóðingartilfari j.nr. 18/01973-18 og at beina málið í býráðið við atliti til at bjóða verkætlanina út í alment útboð.

**Ískoyti:**
Hesar broytingar eru gjørdar í mun til útbjóðingartilfarið sum fíggjarnevndin hevur samtykt 19.09.2019:

- Tíðarætlan fyri tilgongdina er løgd afturat.
- Undir "Myndugleikatreytir og byggisamtykt" er hetta lagt afturat: "Kommunan skilar sær rætt til at seta treytir til byggingina viðvíkjandi, staðseting, arkitektur og annað".
- Fylgiskjølini byggiøki, uppmátingarplanur og skurðir yvir økið eru løgd við

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tikið verður undir við endurskoðaðu útbjóðingartreytunum j.nr. 18/01973-21 Útbjóðingartilfar undir Kongavarða endaligt, at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. september 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bergun Kass, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 26. september 2018:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 222/18 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |
| 20 Tekniska nevnd | 09.05.2017 | 31/17 | 14/03118-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 163/17 | 14/03118-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 186/17 | 14/03118-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 66/17 | 14/03118-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 266/17 | 14/03118-2 |
| 25 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 276/17 | 14/03118-2 |
| 26 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 300/17 | 14/03118-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 17/18 | 14/03118-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 112/18 | 14/03118-2 |
| 29 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 34/18 | 14/03118-2 |
| 30 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 187/18 | 14/03118-2 |
| 31 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 150/18 | 14/03118-2 |
| 32 Tekniska nevnd | 14.08.2018 | 45/18 | 14/03118-2 |
| 33 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 235/18 | 14/03118-2 |
| 34 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 193/18 | 14/03118-2 |
| 35 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 222/18 | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri 'trafikafvikling' grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í

hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12): notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni. Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.

Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.
Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning
TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við byggingina.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01243-3 | Tilboð frá Articon P/f |
| TK j. nr. 17/01245-1 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle
Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at planleggja vegaføringina inni á skúlaøkinum í Marknagili og umleggingina av høvuðsveganetinum rundan um skúlaøkið, sum er Marknagilsvegurin, Landavegurin og Kirkjubøarvegurin.

**Rundkoyring á vegamótinum Landavegur - Samdingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Arbeitt hevur verið við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina rundkoyring á vegamótinum, sum líkist rundkoyringini á vegamótinum Fræsið/Landavegur.

**Sambindingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Vegaføringin er ein tvísporaður vegur á 2*3,25 við 2 m gongubreyt og 2 m súkklubreyt í báðum borðum.
Ein íbinding verður vestur til Dagstovnin við Landavegin, av tí at ætlanir eru um, at verandi íbinding frá Landavegnum verður niðurløgd.
Ein íbinding verður gjørd inn til nýggja musikkskúlan.

Fyri at gera av- og ásetingarætlanina so trygga sum møguligt til nýggja Skúlan á Fløtum, verður vegurin eftir íbindingina eystur til musikkskúlan og niðan til Janusargøtu ein einsrættaður vegur.

**Vit byrja í niðara borði**

| | | |
|---|---|---|
| Gongubreyt | 2,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Einsrættað vegbreyt | 3,25 | m |

| | | |
|---|---|---|
| Ferðsluherða | 1,5 | m |
| Vegbreyt til av- og áseting | 2,5 | m |
| Av- og ásetingarherða | 1,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Gongubreyt | 2,0 | m |

**Íbinding frá Janusargøtu og vestur í sambindingarvegnin**
Janusargøta verður bundin í sambindingarvegin.
Her er neyðugt við umleggingum av verandi tekniskum installatiónum í Janusargøtu.
Arbeiðstøkumarkið verður millum ognina hjá Tórshavnar kommunu og økið, sum hoyrir til Glasir.
Ætlanin er at 12 m bussar skulu kunna koyra inn á Janusargøtu frá sambnindingarvegnum. Samstarvsfundir hava verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Glasir, har veganetið inni á kommunalum vegaøki og vegaøkinum hjá Glasir ver planlagt soleiðis, at sleppast kann inn á skúlaøkini við bussum. Eisini verða busslummar planlagdir.

**Íbindingin av Sambindingarvegnum í Marknagilsvegin sunnanfyri íbúðarblokkin við Janusargøtu**
Her verður talan um ein t-kross, sum verður stýrdur av intelligentum ferðsluljósum. Verandi íbinding frá vegnum undir Gráasteini er ikki haldbar, at tí at torført verður at sleppa inn og út á Marknagilsvegin.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Kirkjubøarvegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Landavegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Íbindingarvegur frá Glasir**
Hetta vegamótið verður ein t-krossur, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Atkomuvegur til Dánjalstrøð**
Verandi vegamót verður í fyrstu syftu órørt. Tvs verandi T-krossur verur sum hann er í dag. (Umsitingin arbeiðir í planleggingarfasuni við einum sambingarvegi millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin)**.**

**Marknagilsvegurin frá t-krossinum við Dánjalstrøð og suður til t-krossin við endan á Kirkjubøarvegnum**
Neyðugt er at dagføra og tillaga nevnda vegastrekki, soleiðis at tað passar inn í planløgdu vegamótini, sum verða strýrd við ferðsluljósum. Tað snýr seg í stuttum um øking av vegabreiddini, soleiðis at tað verður pláss fyri høgra- og vinstrasvingsbanum, og vegabanum, sum ganga beint fram.

**Ljósreguleringar**
Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri ráðgevingarfyritøku, sum er serráðgevi og framleiðari av ferðslustýringum í sambandi við umlegging ferðsluni á Marknagilsvegum, vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur og verandi ferðsluljósum í býnum. Hendan ráðgevandi fyritøkan er veitari av teimum trimum verandi ferðslustýrdu vegmótunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.

Fundir millum umboð fyri ráðgevan og Tórshavnar kommunu hava verið í Tórshavn 2.- 3. og 4. mai.
Ferðslustýrdu vegamótini koma at tosa saman gjøgnum eina radarskipan, sum verður partur av teknisku loysnini, soleiðis at ferðslan kann ganga so ótarnað sum gjørligt. Til ber eisini at gera broytingar í sjálvari stýringini av ferðslustýringini gjøgnum fartelefon ella gjøgnum teldu, um hetta gerst neyðugt. Eisini verður møguligt hjá teknisku umsiting at fylgja við vegamótunum digitalt og visuelt. Møguleiki er eisini at fáa feilmeldingar gjøgnum sms og teldupost, soleiðis at feilir kunnu rættast uttan at fara á staðið.

**Ferðslusimuleringar**
Ferðslusimuleringar eru gjørdar og verða dagførdar eftir tørvi.

Mælt verður til, at veitingin og ráðgevingin í sambandi við ferðslustýrdu ljósini verður sum byggiharraveiting.
Arbeitt verður við at bjóða ráðgevingina í sambandi við entreprenørarbeiðið út 9. mai. 2017.

**Tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar**

| | | |
|---|---|---|
| Glasir | Heystið | 2018 |
| Nýggi musikkskúlin | Várið | 2019 |
| Skúlin á Fløtum | Heystið | 2020 |

Umbyggingin av Marknagilsvegnum saman við ferðslustýrdu vegamótunum nr. 3 og 4 og vegurin frá Marknagilsvegnum og oman í Janusargøtu verður liðugt gjørt til komandi summar. Víst verður til plantekning.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Fyribils kostnaðarmeting og gjaldsætlan**
Umsitingin hevur, saman við byggiharraráðgevanum, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting og eina gjaldsætlan, hvussu arbeiðið kann verða raðfest yvir ár, soleiðis at tey planløgdu arbeiðini verða liðug til tíðina. Víst verður til omanfyri standandi tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar.
Verandi ráðgevi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av planløgdu arbeiðunum, sum eru fyri framman. Eisini er eitt kortskjal gjørt, har ein kostnaðarmeting er sett í rammu fyri hvørt arbeiðið sær.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01246-3 | HMP-Consult_Kostnaðarmeting saman við einum kortskjali |
| TK j. nr. 16/02144-7 | Yvirlitskort av vegaføringum og vegamótum saman við Orthofoto |
| TK j. nr. 17/01245-2 | Kostnaðarmeting C og gjaldsætlan fyri nevndu arbeiðir |
| TK j. nr. 14/03118-68 | Notat frá Rambøll – Trafikafvikling Marknagil |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna fyriliggjandi prosjektuppskot, bjóða út ráðgevingararbeiðið at gera høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mai 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti:**
Projektleiðslan fyri Skúlan á Fløtum mælir staðiliga til, at vegurin frá Marknagilsvegunum til Landavegin verður gjørdur beinanvegin.

Grundgevingin er at spreingjast skal fyri vegnum, kloakk og fjarhita, sum kann skaða bygningin, um hettar verður gjørt seinni. Enn eru bert fundament og veggir stoypt.

Vegaføringin er bert 20 m frá Skúlanum á Fløtum og nærri Musikkskúlanum, sum eisini er í gerð.

Tekniska umsitingin hevur, saman við ráðgevanum, mett um kostnaðin av at gera vegakassan heilt oman til Landavegin, soleiðis at hann kann brúkast til arbeiðsveg, at leggja kloakkleiðingar, og gera tað møguligt at føra fjarhitaleiðingarnar farm til til skúlan á Fløtum og Musikkskúlan. Metti kostnaðurin fyri hetta er 5,2 mió. kr. uttan MVG.

Yvirlit yvir ætlaða játtan verður tøkt til fundin í Fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við projektleiðsluni og mæla til at fáa eina eykajáttan á 6 mió. kr., fíggjað av tøkum peningi á tekniska økinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Eisini verður mælt til at arbeiðið verður boðið út beinan vegin, við tí treyt at fígging fæst.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 6 mió kr., ið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við atkomuviðurskifti við Glasir, er avrátt at av- og á skipan til Glasir skal skipast á teirra egna øki. Hendan ætlan ber í sær, at tal av parkeringsplássum minkar við umleið 30

plássum. Skotið verður upp at etablera tey mistu p-plássini á økinum omanfyri skúlan, (sí skitsu 01). Hettar økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu og Føroya Handilsskúla.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við at arbeitt verður víðari við uppskotinum og mæla til, at kommunan útvegar neyðugan part av lendinum burtur av matr. nr. 1101a.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin arbeiðir við eini endaligari parkeringsloysn sum umfatar alt økið.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina hjá teknisku nevnd, skal umsitingin arbeiða við einari endaligari parkeringsloysn, sum umfatar alt økið burturav matr. nr. 1101a, Tórshavn, sum liggur millum bygningin hjá Handilsskúlalanum og matr. nr. 1101b, Tórshavn. Neyðugt er tískil, at hesin parturin av matr. nr. 1101a, Tórshavn, verður lagdur av til parkeringsøki allur sum hann er.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við teknisku nevnd og leggja tann í ískoytinum nevnda part av matr. nr. 1101a, Tórshavn, av til parkeringsøki sum liður í einari endaligari parkeringsloysn fyri økið kring Glasir.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Komið er nú somikið áleiðis, at vegamótini sunnan- og norðanfyri Handilsskúlan skulu fremjast. Glasir tekur eftir ætlan nýggja skúlan í brúk komandi skúlaár og miðað verður ímóti at vegamótini tá eru liðug. Í tí sambandi er neyðugt at fáa arbeiðið boðið út og at keypa inn ferðsluljósini til bæði vegamótini.

Projekteringin er liðug og klárt er at bjóða arbeiðið út. Sí viðhefta skjal, Planur Marknagilsvegur, j.nr. 14/03118-85.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd av omanfyri nevnda arbeiði, áljóðandi kr. 4.300.000,- Ætlanin er, at kommunan sjálv keypir inn ferðsluljósini og at sjálvt vegarbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Avsettar eru kr. 2.000.000,- til vegagerð í Marknagili í inniverandi ári. Framfluttar eru kr. 6.426.000,- frá 2017. Samlaða játtanin er sostatt kr. 8.426.000,- Av hesum skulu kr. 4.030.000,- til vegagerð fram við skúlanum á Fløtum.

Mett verður at alt arbeiðið kann fremjast fyri játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeiðið verður boðið út, og at kommunan keypir og fær til vega ferðsluljós til vegamótini.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir  við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir samtyktina í Teknisku nevnd 08.mai 2018, skuldi málið verið beint í Býráðið umvegis Fígggjarnevndina. Tað koma tað av misgávum ikki, hetta verður við hesum gjørt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtanin á kr. 2 mió. til endamalið verður flutt av L00001 yvir á verkætlanina L81018 og málið verður beint í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Sum lýst omanfyri, samtykti tekniska nevnd á fundi tann 8. mai 2018, at arbeiðið við at betra um umstøðurnar við Marknagilsvegnum skuldi bjóðast út og at keypt verða inn ferðsluljós til tey bæði vegamótini, sum hava við atkomuviðurskiftini hjá Glasi at gera.

Ferðsluljósini eru bíløgd og koma tey til landið síðst í august og verða tá eftir ætlan uppsett.

Vegaprojektið hevur verið boðið út í tveimum umførum og er lægsta tilboð 10,7 mió. kr. uttan MVG. Afturat hesum skal roknast við óvæntaðum og projekteringsútreiðslum, eins og uppsetan av ferðsluljósum. Samlað kemur hendan verkætlanin at kosta góðar 13 mió. kr.

Tøkur peningur til verkætlanina er p.t. kr. 5.392.000,-. Av hesari upphædd skulu brúkast kr. 2.787.000,- til vegarbeiði sum er ígongd og til ferðsluljósini. Eftir av játtanini eru sostatt **kr. 2.600.000,-** Sí talvu niðanfyri.

Um verkætlanin skal fremjast, krevur tað at neyðugur peningur er tøkur til endamálið. Hettar kann gerast við flyting millum konti og eini eykajáttan.

| | **Upphædd** |
|---|---|
| Kostnaður í alt | 13.300.000 |
| Tøk upphædd á L81018 (8175) | -2.600.000 |
| | 10.700.000 |
| Fíggjast av L00002 (8175) | -6.636.000 |
| At fíggja av konto 6175 | 4.064.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við verkætlanini, at tikið verður av tilboðnum og at peningurin til verkætlanina verður fingin til vega við at fluttar vera kr. 6.636.000 frá L00002 til L810018 og at fíggja restina, kr. 4.064.000 av konto 6175, sum ein eykajáttan.

Málið viðvíkjandi eykajáttan á kr. 4.064.000 av konto 6175 verður umvegis teknisku- og fíggjarnevnd beint í Býráðið, har tað krevur 2 viðgerðir.

**Tekniska nevnd 14. august 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykt at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og 4 blonkum.
Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Kaj Leo Holm Johannesen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongar ímóti og 4 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreassen, Bergun Kass og Odd Færø.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

# 223/18 Keyp av nýggjum stigabili í sambandi við Glasir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2016 | 82/16 | 16/01084-1 |
| 2 Tilbúgvingarnevndin | 20.03.2017 | 3/17 | 16/01084-1 |
| 3 Tilbúgvingarnevndin | 12.06.2017 | 5/17 | 16/01084-1 |
| 4 Tilbúgvingarnevndin | 18.09.2017 | 8/17 | 16/01084-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 234/17 | 16/01084-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.12.2017 | 322/17 | 16/01084-1 |
| 7 Tilbúgvingarnevndin | 19.02.2018 | 4/18 | 16/01084-1 |
| 8 Tilbúgvingarnevndin | 12.06.2018 | 6/18 | 16/01084-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 226/18 | 16/01084-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 259/18 | 16/01084-1 |
| 11 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 223/18 | 16/01084-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 25. februar 2016:** Einmælt samtykt heimila umsitingini at samráðast um keyp av stigabili.

**Ískoyti:**
Stigabilurin má klára 55 mtr., fyri at fyri at klára hæddina frá teim 5 føstu støðunum ið verða gjørd til at seta eina stigabilin á, ið skal skal røkka einar 27 mtr. til hvørja síðu.

Samráðst hevur verið við Bronto Skylift, ið er sama merki sum verandi stigabilur. Neyvur prísur á stigabilinum kann ikki staðfestast, fyrr enn kommunan hevur tikið avgerð um, hvat chassi valt verður og hvørja útgerð krevst til at stigabilurin virkar sum ætlað.

Leveringstíðin er umleið 40 vikur frá ordra. Viðheft síðsti faldari av einum slíkum stigabili.

Tá nýggi stigabilurin er komin til landið, verður nú 17 gamli stigabilurin seldur. Ógreitt er hvat kann fáast fyri gamla stigabilin.

**Tilmæli:**
Sløkkiliðsstjórin mælir til at at fara undir realitetstingingar við Bronto Skylift at leggja fyri aftur næsta tilbúgvingarfund, til endaliga samtykt og at játtað .

**Tilbúgvingarnevndin 20. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, sum verður lagt fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Stigabilurin er neyðugur fyri at veita nøktandi fólkatrygd í sambandi við skúlan Glasir.
Víst verður til hjálagda notat j. nr. 16/01084-8

**Tilmæli:**
Sløkkiliðsstjórin mælir tilbúgvingarnevndini til at keypa stigabilin.

**Tilbúgvingarnevndin 12. juni 2017:**
Samtykt at taka fund við landsstýrið viðvíkjandi tilbúgvingini í sambandi við Glasir.

**Ískoyti:**
Í samband við útvegan av nýggjum stigabili til Glasir, varð ført fram, at eingi bjargingarop vóru í bygninginum.

Sløkkiliðsstjórin skal hervið kunna nevndina um, at øll bjargingarop, sum vit hava sett krav um, eru til staðar.
Øll tey vindeygu sum síggjast eru bjargingarop.

**Tilbúgvingarnevndin 18. september 2017:**
Nevndin er samd um, at leggja málið fyri fíggjarnevndina og at kanna aðrar fíggingarmøguleikar.
Nevndin staðfestir, at kommunan eigur ikki, at bera meirkostnaðin av einum longri stigabili, tá bygt verður hægri enn tað, sum verandi skipan klárar.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2017:** Samtykt at senda landsstýriskvinnuni í mentamálum skriv frá HMP, j.nr. 16/01084-17, við áheitan um at greiða viðurskiftini viðvíkjandi tilbúgvingini á Glasi.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Tilbúgvingarnevndin 19. februar 2018:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
**Støðan í sambandi við stigabilinum hjá Tórshavnar Sløkkiliði:**

Verandi stigabilur er frá desember 1999, t.v.s., at í desember 2019 verður hann 20 ára gamal, og tá skal hann til 20 ára eftirlit, um vit framhaldandi skulu kunna brúka hann.
Hetta eftirlit krevur, at stigabilurin skal á autoriserað verkstað hjá Bronto Skylift í Finlandi. Ein partur av el-netinum skal skiftast, umframt at stórur partur av hydraulikkslangunum og ventilum eisini skulu skiftast. Allir bummar verða røntgenmyndaðir fyri rivur í metallinum, og boltarnir á svingkransinum skiftir. Annars verður ein nágreinulig gjøgnumgongd av øllum bilinum gjørd, og tey brek, sum verða funnin mugu rættast/skift.

Ein kostnaðarmeting fyri eftirlitið kemur at liggja um 1 mill.kr.

Tá vit so hugsa um støðuna, sum hon er í dag, kunnu vit staðfesta, at verandi stigabilur ikki klárar at nøkta tørvin, sum nú er í Tórshavnar kommunu.

Glasir er nýggjasta dømi, har vit við verandi stigabili ikki klára at loysa tær uppgávur, sum krevst av tí kommunalu tilbúgvingini. Vit røkka ikki teimum bjargingaropum sum krevst til persónbjarging, umframt at vit ikki røkka upp inn yvir takið á Glasir, sum kann gerast neyðugt í sambandi við sløkking.

Eisini kunnu vit vísa á Landssjúkrahúsið, sum fyri nøkrum árum síðani varð klætt av nýggjum, og har nýggi klædningurin er uml. 3 metrar hægri enn fyrrverandi. Hetta ger, at vit ikki røkka uppá takið har rýmingarleiðir eru.

Vit kunnu eisini vísa á fleiri íbúðarblokkar, sum eru bygdir, t.d. Heimasta Horn og undir Kongavarða, har tað avgjørt er ein fyrimunur við longri stigabili fyri at røkka framat blokkunum.

Samanumtikið haldi eg, at Tórshavnar kommuna sum skjótast skal taka eina avgerð, um at útvega ein nýggjan og longri stigabil, soleiðis at kommunan kann standa inn fyri, at kommunala tilbúgvingin er før fyri at røkja sínar uppgávur tá talan er um eld/óhapp í sambandi við hægri bygningar.

**Tíðarfreist:**
Tað er eitt ára avgreiðslutíð uppá ein nýggjan stigabil, t.v.s., at er ætlanin at ein nýggjur stigabilur skal setast í tænastu fyri tann gamla, seinast 1. desember 2019, krevur tað at vit hava sett hann í ordra innan 1. oktober 2018.

**Kostnaðarmeting:**

| | | |
|---|---|---|
| *Tilboð frá Bronto Skylift dagfest 15-02-2018:* Stigabilur 53 metrar | kr. | 4.880.000,00 |
| *Tilboð frá Berg Motors dagfest 16-02-2018:* Scania Chassi lev. hjá Bronto | kr. | 1.120.000,00 |
| Frakt | kr. | 50.000,00 |
| Skráseting, umhvørvis- og burturbeiningargjald | kr. | 50.000,00 |
| Tilsamans | kr. | 6.100.000,00 |
| MVG 6,25% | kr. | 381.250,00 |
| **Samlað** | **kr.** | **6.481.250,00** |

*Okkara ábyrgd er at tryggja okkum, at tilbúgvingin í Tórshavnar kommunu framhaldandi er á einum høgum støði, eisini tá talan er um eld/bjarging í háhúsum, sum eru í kommununi, tí er hetta ein neyðug íløga sum má gerast*

**Tilmæli:**
Sløkkiliðsleiðarin mælir til, at vit arbeiða við, at fáa eitt endaligt keypstilboð uppá stigabil frá Bronto Skylift og uppá chassi frá Berg Motors, soleiðis at hesi kunnu liggja klárt til at undirskriva í seinasta lagi 1. oktober 2018.Soleiðis at ein nýggjur stigabilur kann verða tøkur, áðrenn verandi stigabilur verður 20 ár í desember 2019.

**Tilbúgvingarnevndin 12. juni 2018:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla fíggjarnevndini til, at peningur verður avsettur 2019-2020.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at heimila umsitingini at innheinta tilboð uppá nýggjan stigabil frá fleiri veitarum, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur biðið um 3 tilboð, tað er frá Bronto Skylyft (Finnland), KJ hydralikk (Finnland) og Brand & Teknikk (Danmark).

Væntandi koma tilboðini inn áðrenn fundin og verða framløgd á fundinum, saman við tilmæli.

Keyp av Chassi er ikki boðið út, men ætlanin er at keypa ein Scania bil frá Berg Motors í Tórshavn, til veitan hjá uppbyggjara, hetta er chassi sum Bronto Skylift fyrisláa hesi til teirra stiga/lyft. Viðmerkjast skal, at hinir bilarnir sum Sløkkiliðið hevur eru Volvo.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjóri og virkandi sløkkiliðsstjóri mæla til, at taka av tilboðnum frá Bronto Skylift, sum hevur lægsta boð.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við lægsta boð og at beina málið í býráðið. Víst verður til fígging í máli nr. 18/03373.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

# 224/18 Langfreistað skuld

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 267/18 | 18/03385-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 224/18 | 18/03385-1 |

**Málslýsing:**

Tilráðingin er, at kommunan hevur eitt minsta gjaldførið á 80 mió. kr.
Gjaldførið í kommununi er mett at vera nøktandi soleiðis at partur av langfreiðstaðu skuldini kann vera niðurgoldin. Mælt verður til, at fastrentu lánini verða afturgoldin í árinum. Sí skjal nr. 18/03385-2

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at afturgjalda fastrentulánini.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

## 225/18 Eykajáttan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 266/18 | 18/03373-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 225/18 | 18/03373-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 18/03373-1 |

**Málslýsing:**
Eykajáttan krevst í sambandi við hækking av samtyktu fíggjarætlanini, við hækking av bæði inntøkum og útreiðslum.Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað. Eyka játtanir skulu vera samtyktar við aðru viðgerð innan 31. desember í fíggjarárinum.
Inntøkurnar hava verið hægri enn mett og gevur hettar møguleika fyri at hækka fíggjarætlanina í árinum. Framskrivaður kommunuskattur og skattur av eftirlønargjøldum eru 12,9 mió. kr. hægri enn mett. Fleiri rakstrarstøð eru við manglandi fígging og kann tøkið peningurin nýtast til fígging av hesum.

*Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið:*
Víst verður til mál 17/03801 Cosmic talgild sjúklingajournalskipan til eldraøkið. Samtykt var á býráðsfundi 24. apríl at geva Kommunufelagnum tilsøgn um, at Tórshavnar kommuna tekur lut í ætlanini við Cosmic. Peningur 1,5 mió. kr. er ikki settur av til endamálið.

*Umsiting og røkt av bygninguum:*
Tørvur er á at hækkað játtanina til umsiting og røkt av bygningum við 1,4 mió. kr. at nýta soleiðis:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Løgmannabreyt ljós í kantinu skiftast til LED | 100.000 kr. |
| Lágagarður útskiftan av 12 stk. cirkulatiónspumpum | 180.000 kr. |
| Eysturskúlin útskiftan av cirkulatiónspumpu | 50.000 kr. |
| Eysturskúlin útskifta ljósarmaturir í A bygningi | 450.000 kr. |
| Eysturskúlin útskifta ljósarmaturir í B bygningi | 200.000 kr. |
| Realskúlin meirveitingar | 420.000 kr. |

*Rakstrargøgn:*
Játtanin er til at keypa størri amboð, maskinur, bilar o.a. hjá kommununi. Á hvørjum ári verður gjørdur ein raðfestingarlisti yvir, hvørji amboð og maskinur neyðugt er at skifta út, og somuleiðis hvørjar nýútveganir eru neyðugar.
Mett er, at neyðugt er at hækkað játtanina til rakstrargøgn við 7,1 mió.kr. . Bráneyðugt er at fá ein nýggjan rottangabil. Eisini verður víst til mál nr. 16/01084 keyp av nýggjum stigabili í sambandi við Glasir.

*Kavarudding:*
Játtanin er til kavarudding. Útreiðslurnar kunnu vera sera skiftandi frá einum ári til annað,
alt eftir hvussu vetrarnir roynast. Staðfestast kann, at kontan væntandi fer at hava eina meirnýtslu á 2 mió. kr. í 2018.

*Renovatión:*
Kommunala Brennistøðin hevur til endamáls at røkja kommununnar uppgávur og skyldur í sambandi við burturkast. Økið er í stóran mun regulerað í lógum og kunngerðum.
Tørvur er á at endurnýggja stýrisskipan á ovni á kommunalu Brennustøðini. Mettur kostnaður er 500 t.kr. Eisini er neyðugt at seta 100 t.kr. av í sambandi við slit á rottangaútgerð.

*Sløkkiliðið:*
Brandstøðin sløkkir eld, hevur kavarar tøkar til druknivanlukkur og tekur sær av umhvørvisóhappum, ferðsluvanlukkum og bjarging í sambandi við storm og vatnskaðar. Neyðugt er at skifta lógarkravda útgerð sum er útgingin. Mettur kostnaður er 300 t.kr.

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at tøki peningurin verður nýttur til at fíggja niðanfyri standandi soleiðis:

| | |
|---|---|
| Cosmic | 1.500 |
| Umsiting og røkt av bygningum | 1.400 |
| Rakstrargøgn | 7.100 |
| Kavarudding | 2.000 |
| Renovatión | 600 |
| Sløkkiliðið | 300 |
| | **12.900** |

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið at viðgera sum eykajáttan tvær ferðir.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

# 226/18 Fíggjarætlan 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 157/18 | 18/01927-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 205/18 | 18/01927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 191/18 | 18/01927-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 13.09.2018 | 34/18 | 18/01927-1 |
| 5 Vinnunevndin | 13.08.2018 | 31/18 | 18/01927-1 |
| 6 Eldranevndin | 10.09.2018 | 10/18 | 18/01927-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 265/18 | 18/01927-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 226/18 | 18/01927-1 |
| 9 Vinnunevndin | 01.10.2018 | 40/18 | 18/01927-1 |
| 10 Eldranevndin | 01.10.2018 | 12/18 | 18/01927-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 02.10.2018 | 51/18 | 18/01927-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 193/18 | 18/01927-1 |
| 13 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.10.2018 | 50/18 | 18/01927-1 |
| 14 Trivnaðarnevndin | 01.10.2018 | 38/18 | 18/01927-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 285/18 | 18/01927-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §39 stk. 1-2 í kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober. Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin, sum er yvirskipaði fíggjarpolitiski karmurin fyri komandi roknskaparár, skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Stjórnin leggur tekniska framskriving av fíggjarætlanini og uppskot til fíggjarætlanarkarmar fyri fíggjarnevndina at viðgera.

**Ískoyti:**
Búskaparvøksturin hevur hevur haft eina jaliga ávirkan á inntøkurnar. Fólk vilja búgva í Tórshavnar kommunu, og hevur kommunan seinastu árini haft eina tilflyting. Samstundis er tó eitt trýst á útreiðslusíðuni. Fleiri børn eru í kommununi, og neyðugt er at taka hædd fyri økta barnatalinum. Býðurin vaksur og ávirkar hettar somuleiðis fíggjartørvin á tekniskaøkinum. Størsta útreiðsluøki hjá kommununi Almanna- og heilsumál og eru og hevur kommunan somu demografisku avbjóðingar sum aðra staðir. Tíðirnar eru enn góðar, men vit eiga støðugt at ansa eftir, at rakstrarútreiðslurnar halda seg á einum varligum stigi.

Yvirskipað er málið í uppskotinum ein vøkstur í rakstrarútreiðslum uppá í mesta lagi 2% fyri alla kommununa. Í sambandi við rakstrarútreiðslurnar eigur kommunan, at hava støðugt fokus á um skattakrónurnar verða nýttar so skynsamt sum møguligt. Sum ein liður í hesum skulu útveiting og útboð av vørum og tænastum, har kommunan og borgarin kunnu fáa fyrimun, eftirkannast. Eisini verður mælt til at brúkaragjøld í kommununi vera endurskoðaði.

Lønarsamráðingar hava verið síðani oktober 2018. Hædd er tikið fyri hesum í karmunum fyri 2019 har 2,5% er løgd inn fyri lønarvøkstur, umframt ein regulering á 1% í lønum fyri 2018.

Mælt verður til at halda samlaðu íløgurnar innanfyri skattafíggjaða íløgukarmin, og at ein langtíðaríløguætlan verður gjørd fyri Tórshavnar Kommunu, sum lagar íløgur og rakstur til

sveiggj í búskapinum. Hettar eisini við atliti til, at samlað leggja stóru íløgurnar týðandi trýst á búskapin og kommunan fær munandi minni fyri skattakrónurnar.

**Tilmæli:**
Stjórnin og fíggjarleiðarin mæla fíggjarnevndini til, at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlanarkarmar á greinastøði 2019. Stjórarnir skulu saman við umsitingini, gera fíggjarætlan og nýggjar metingar fyri 2019, sambært uppskotinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Sambært tíðarætlan fyri Fíggjarætlan 2019 skal stjórnin leggja uppskot til fíggjarætlan á greinastøði fyri fíggjarnevnd.

Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá status í mun til fíggjarætlanina 2018 og møguligum tørvi á broytingum ella raðfestingum til fíggjarætlanina 2019 á greinum 3, 4 og 5, sí annars samtykt um fíggjarkarm fyr 2019. Sí eisini hjálagt skjal.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða fíggjarætlanina við støði í omanfyri nevnda.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Umrøtt.

**Vinnunevndin 13. august 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Til umrøðu.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Trivnaðarnevndin 13. september 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við uppskotinum til fíggjarætlan 2019 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum eru, at skattaprosentið verður verandi á sama støði, barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. og hædd er tikið fyri virksemisbroytingum. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2017 | Ætlan 2018 | Ætlan 2019 | Broyting 2018/2019 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 760.890 | 758.000 | 800.740 | 5,6% | *42.740* |
| 20601 | Felagsskattur | 49.662 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | *0* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 2.180 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 119.692 | 123.151 | 131.718 | 7,0% | *8.567* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 37.224 | 38.167 | 34.979 | -8,4% | *-3.188* |
| 20803 | Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | | | | | |
| | **Inntøkur íalt** | **969.648** | **951.318** | **999.437** | **5,1%** | ***48.119*** |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 82.797 | 82.151 | 91.798 | 11,7% | *9.647* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 221.876 | 236.172 | 242.232 | 2,6% | *6.060* |
| §3 | Børn og ung | 159.434 | 168.185 | 179.729 | 6,9% | *11.544* |
| §4 | Undirvísing | 40.163 | 41.082 | 42.210 | 2,7% | *1.128* |
| §5 | Mentan og frítíð | 51.177 | 52.291 | 55.969 | 7,0% | *3.678* |
| §6 | Teknisk mál | 117.093 | 130.250 | 136.567 | 4,9% | *6.317* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 64.971 | 64.070 | 68.114 | 6,3% | *4.044* |
| §7 | Kommunal virkir TH | -44.831 | -32.235 | -38.210 | 18,5% | *-5.975* |
| | **Rakstur íalt** | **692.680** | **741.966** | **778.409** | **4,9%** | ***36.443*** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 18.046 | 18.000 | 18.000 | 0,0% | *0* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 5.635 | 2.456 | 2.500 | 1,8% | *44* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **23.681** | **20.456** | **20.500** | **0,2%** | ***44*** |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **253.286** | **188.896** | **200.528** | **6,2%** | ***11.632*** |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 3.468 | 3.000 | 700 | -76,7% | *-2.300* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | | 17.060 | 0,0% | *17.060* |
| 20401 | Rentuinntøkur | 90 | 100 | 0 | -100,0% | *-100* |
| | **Rentur íalt** | **3.378** | **2.900** | **17.760** | **512,4%** | ***14.860*** |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **249.908** | **185.996** | **182.768** | **-1,7%** | **-3.228** |
| | **Avdráttir** | **18.193** | **18.900** | **1.234** | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **231.715** | **167.096** | **181.534** | **8,6%** | **14.438** |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **186.884** | **134.861** | **160.384** | **18,9%** | **25.523** |

* Avlop uttan Tórshavnar Havn

Samlaðu inntøkurnar eru mettar at vera 999 mió. kr. í mun til 951 mió. kr. í 2018. Hettar svarar til ein vøkstur á 5,1%.

Í uppskotinum er kommunuskatturin framroknaður við støði í inntøkunum fyrstu átta mánaðirnar í árinum. Harumframt er roknað við einum vøkstri upp á 3%. Eisini er partvís

tikin hædd fyri reguleringini í kommunuskattinum fyri 2018. Inntøkur frá kommunuskattinum hækka sostatt 5,6% ella 43 mió. kr. í mun til fíggjarætlanina fyri 2018.

Inntøkur í sambandi við skatti av eftirlønargjøldum og DIS, FAS og frádráttum eru ásettar sambært upplýsingum frá Fíggjarmálaráðnum.

Tórshavnar kommuna er ein kommuna í stórum vøkstri og merkir hettar økt virksemi og tænastur. Samlaðu útreiðslurnar økjast úr 742 mió. kr. til 778 mió. kr. tvs. við 4,9% ella við 36 mió. kr. í mun til upprunaligu fíggjarætlanina fyri 2018. Hædd er tikin fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum.

Lønarútreiðslurnar økjast 6,6% ella 36,6 mió. kr. Herav er lønarhækkanin 16 mió. kr. Raksturin annars økist 3,1 % ella 11,8 mió. kr. og inntøkur annars økjast 6,5% ella 11,9 mió.kr.

*§1 kommunual fyrisiting* økist við 11,7% ella 9,6 mió. kr. Ein partur av økingini kemst av, at Heilsu- og umsorganarfyrisitingin er flutt frá §2 til §1, talan er um kr. 3,9 mió. kr. Uttan hesa flyting var økingin 7,0%. Økingin annars stendst í høvuðsheitum av, at peningur er settur av til Løgtings- og fólkatingsval í 2019, umframt øking í virkseminum á teknisku fyrisiting.

*§2 Almanna- og heilsumál* økist við 2,6% ella 6,0 mió. kr. Vøksturin kemst millum annað av húsaleiguútreiðslum til læknaviðtaluhøli, yvirtøku av rakstrarútreiðslum til smábarnavirksemi hjá Gigni og øktum útreiðslum til ávísar serfrøðingakanningar og fyriskipanir innan barnavernd.

Játtanin til *§3 børn og ung* fylgir í høvuðsheitum barnatalinum, sum væntandi verður munandi hægri í 2019. Sum nýggj raðfesting eru 2. mió. kr. settar av til dygdarmenning á dagstovnaøkinum. Sambært uppskotinum økjast útreiðslurnar til børn og ung 6,9% ella við 11,4 mió. kr.

Játtanin til *§4 Undirvísing* hækkar við 2,7% ella 1,1 mió. kr. Játtanin fylgir mettað næmingatalinum. Økingin annars er til betri internet á skúlunum.

Virksemið á *§5 Mentan og frítíð* er økt. Útreiðslurnar økjast við 7,0% ella 3,7 mió. kr. Hædd er tikið fyri, at Musikkskúlin flytir í størri høli, rakstur av Müllers Pakkhúsi og Finsen, og at nýggj avtala verður gjørd við Fjølrit um upphavsrættindi.

*§6 Teknisk mál* økist við 4,9% ella 6,3 mió. kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin eru fleiri fermetrar hjá húsaumsigingini at viðlíkahalda. Tórshavnar kommuna stendur í vøkstri og verða fleiri nýggj økir at umsita. Fleiri nýggir og yvirtiknar vegir eru at viðlíkahalda.

Játtanin til *§7 Kommunal virkir* lækkar í mun til árið frammanundan, við -6,1% ella 1,9 mió. kr. Orsøkin til lækkingina er at játtanin til Tórshavnar Havn lækkar við 6 mió. kr. Játtanin til talgilding til borgaran hækkar, játtanin er til menning av talgildum loysnum til borgaran, hemasíðu og talgilda sjálvagreiðslu. Eisini hækkar játtanin til bussleiðina vegna prístalsjavnan av verandi sáttmála.

Sambært fyriliggjandi uppskoti við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður úrslit áðrenn rentur 200,5 mió. kr. Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir 182,8 mió. kr. Avlop til skattafíggjaðar íløgur verður 160,4 mió. kr.

**Tilmæli**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober. Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælnum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Framlagt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. september 2018 | Blað nr.: 882<br><br>Formansins merki: |

# 227/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 158/18 | 18/00018-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 134/18 | 18/00018-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 212/18 | 18/00018-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 167/18 | 18/00018-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 239/18 | 18/00018-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 197/18 | 18/00018-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 268/18 | 18/00018-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 227/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar | Fyri ávís økir í | Fyri ávísar samfelagsbólkar | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>27. september 2018 | Blað nr.: 883 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| | kommunu | kommununi | ella felagsskapir | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri juni verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Ískoyti:**

Roknskapurin fyri juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Framlag og góðkent.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**FUNDURIN LOKIN KL. 21.00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Tróndur Sigurðsson | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle | Turið Horn |
| Bergun Kass | Heðin Mortensen | Bjørg Dam |
| | Odd Færø | |